# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 19.40

## 133/14 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2014

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 8/14 | 14/01236-1 |
| 2 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 30/14 | 14/01236-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.03.2014 | 48/14 | 14/01236-1 |
| 4 Býráðsfundir | 27.03.2014 | 52/14 | 14/01236-1 |
| 5 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 111/14 | 14/01236-1 |
| 6 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 83/14 | 14/01236-1 |
| 7 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 162/14 | 14/01236-1 |
| 8 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 133/14 | 14/01236-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 04. mars 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. mars 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 27. mars 2014:** Framlagt og gókent.

Roknskapurin fyri mars og apríl 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri mai 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Framlagt og góðkent.

# 134/14 Meirinntøkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 114/14 | 14/02981-1 |
| 2 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 84/14 | 14/02981-1 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 134/14 | 14/02981-1 |

## Málslýsing:

Í ársroknskapinum 2013 kann staðfestast at inntøkurnar í sambandi við skattir og avgjøld er góðar 23 mió. kr. hægri enn mett í fíggjarætlanini.

Mælt verður til, at meirinntøkurnar verða brúktar til fígging soleiðis:

Fyri at arbeiði at skriva Havnar Søgu kann halda fram, verður mælt til at játta 1 mió. kr. til Søvn og mentanararv.

Kommunan tapti eitt sakarmál, sum kostar kommununi uml. 1,5 mió. kr. Mælt verður til at játta 1,5 mió. kr. til konto 20910 aðrar útreiðslur.

Eftir ætlan yvirtekur TK eldraøkið 1. Januar 2015. Fyrireikingararbeiðið í samband við yvirtøkuna er fari í gongd. Staðfestast kann longu nú, at rættuliga nógv fyrireikandi arbeiði skal gerast á ávikavist starvsfólka, fíggjar- og KT-deildini, umframt á trivnaðarfyrisitingini, um yvirtøkan av eldraøkinum skal verða væleydnað. Til at fremja fyrireikandi arbeiði, er neyðugt við starvsfólkaressoursum, sum deildirnar ikki hava í dag. Mælt verður til at játta 1 mió. kr. til starvsfólk í sambandi við yvirtøkuna av eldraøkinum. 500 t.kr. til 1311 miðfyrisiting 250 t.kr. til 1314 Kunningartøkni og 460 t.kr til 1312 Trivnaðarfyrisitingina.

Býráði samtykti tann 30. Mai 2013 at fíggja keyp av bygningi til umsitingina við m.a. sølu av ognum. Vegna væntandi søluinntøkur er konta 6175 keyp og søla í undirskoti. Mælt verður til at 19,5 mió. kr. vera brúktar til at fíggja ein part av undirskotinum.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

# 135/14 Frítíðarskúlin Spírin í Havnardali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 3/14 | 14/01091-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 60/14 | 14/01091-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 15.05.2014 | 122/14 | 14/01091-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 142/14 | 14/01091-1 |
| 5 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 107/14 | 14/01091-1 |
| 6 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 135/14 | 14/01091-1 |

**Málslýsing:**
Frítíðarskúlin í Hornabø var settur á stovn í 1996 og er bert normeraður til 40 børn. Barnatalið vaks tó so skjótt, at hann rættiliga tíðliga gjørdist ov lítil. Tí bleiv Spírin, sum verandi frítíðarskúli í Havnardali eitur, boðin okkum í 2005 sum eitt alternativ eftir ætlan eitt stutt tíðarskeið.

At byrja við fóru 20 børn út í Spíran, men barnatalið vaks støðugt, og tí var gjørt av at hava allan 2. flokk har úti, meðan 1. flokkur varð verandi í Hornabø.

Í 2010, tvey ár eftir at ein varandi loysn av røttum skuldi verið gjørd, var vorðið so trongt í Spíranum, at neyðugt varð at leiga níggju arbeiðsbingjur frá byggifelagnum TG Verk at hava afturat leigaðu hølunum hjá Føroya Ríðingarfelag.

Við børnunum í 3. flokki eru nú 70-75 børn til samans í Hornabø og í Spíranum, og tað er umleið tvífalt so nógv, sum frítíðarskúlin upprunaliga varð normeraður til.

Sæð úr einum námsfrøðiligum sjónarhorni og fyri trivnaðin hjá børnunum var tað sera beinrakið í síni tíð at stovnseta úti-frítíðarskúla Spíran úti í Havnardali. Børnini trívast óføra væl har úti, har tey sleppa at vera úti í náttúruni, at fáast við djórini og spæla bóndur, og har dentur annars er lagdur á fysiskt virksemi. Tey læra um náttúruna við at brúka hana og virka í henni. Her er felags ábyrgd av djórahaldinum, jarðardyrkanini, hegning og bygging.

Í Spíranum verður tað stutt sagt lagt í børnini at fara væl við náttúruni og vera góð við kriatúrini, samstundis sum tey fáa eina rætta, ópyntaða mynd, sum er í samsvar við veruleikan, av, hvussu náttúran og dýrini verða gagnnýtt av okkum menniskjum. At børnini trívast sera væl í Spíranum sæst serliga við, at børn, ið annars hava trupult við at tillaga seg, klára seg fínt her. Eisini vísa kanningar, at børn, sum eru nógv úti, eru minni sjúk enn børn, ið eru nógv inni.

Við at byggja ein nýggjan frítíðarskúla í Havnardali kunnu bráfeingis trupulleikarnir við plásstroti fáa eina varandi loysn, samstundis sum hann kann verða øllum børnum í kommununi, frá skúlaaldri og upp í 18 ár, til fragd og frama.

Eftir ætlan verður frítíðarskúlin í Hornabø/Spíranum, sum í dag hevur børnini í Venjingarskúlanum, partur av nýggja Vesturskúlanum. Tað er tó átrokandi at fáa gjørt umstøðurnar í Havnardali nøktandi til nýggj loysn fyriliggur.

Í mun til fyrireikingar at gera heildarætlan fyri frítíðarskúlaøkið hevur verið nevnt sum uppskot at byggja ein úti-frítíðarskúla ella náttúruskúla, sum eftir eini skipan var felags fyri allar frítíðarskúlar/skúlar í kommununi, so at øll børn fingu lut í hesum øðrvísi tilboði. Spírin er í

dag staðsettur í D2 øki, ítróttarøki, men ein meira hósandi staðseting er hinumegin ríðibreytina fram við vegnum inn í Havnardal. Hetta økið er tó D1 øki, frílendi. Ein bygging á økinum krevur broyting í byggisamtyktini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til prinsippiella viðgerð av uppskotinum um at byggja ein úti-frítíðarskúla ella náttúruskúla í Havnardali, og í hesum sambandi taka støðu til at heita á teknisku nevnd um broyting í byggisamtyktini.

**Mentamálanevndin 12. februar 2014:** Umrøtt og avgjørt at skipa ein temadag um frítíðarskúlaøkið í Tórshavnar kommunu 5. mars 2014, kl. 12.00.

**Ískoyti:**
Temadagur um frítíðarskúlaøkið var 26. mars 2014.

Støðan hjá Spíranum í Havnardali er í løtuni tann, at leigusáttmálin um bingjurnar er uppsagdur, tí bingjurnar vóru í sera ringum standi.

Harumframt hevur Arbeiðseftirlitið í skrivi til kommununa staðfest, at vælferðarskipanin fyri starvsfólkini í leigaðu hølunum hjá Ríðingarfelagnum er ikki nøktandi, og kommunan er biðin um at greiða frá, hvussu ætlanin er at loysa málið.

Víst verður annars til málslýsingina omanfyri bæði um framtíðar ætlan fyri Spíran, sum síggjast skal saman við byggiætlanin um nýggjan Vesturskúla, og bráðfeingis tørv á hølum til frítíðarskúla ætlað børnunum í 2. og møguliga 3. flokki í Venjingarskúlanum.

Eingin játtan er tøk til bráðfeingis loysn, og sum støðan er, kann kommunan ikki veita trygd fyri frítíðarskúlaplássi til onnur enn børnini í 1. flokki í Venjingarskúlanum, og sum halda til í Hornabø.

Mest nærliggjandi bráðfeingis loysn í Havnardali er modulloysn antin leigað ella keypt at seta á tann partin av økinum, sum er D2 ítróttarøki, tvs. á sama stað ella í nánd av har, sum Spírin hevur hildið til. Hølistørvurin er størri, um kommunan eisini sigur upp leiguavtaluna við Ríðingarfelagið. Neyvari meting um hølistørv og kostnaðarmeting skal gerast.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til, at játtan verður fingin til vega at útvega Spíranum fyribilshøli í Havnardali, og at tað í hesum sambandi verður gjørd neyvari meting um hølistørv.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Nevndin er samd um at finna eina loysn, eins og kostnaðarætlan fyri hølistrupulleikunum hjá frítíðarskúlanum í Havnardali at leggja fyri aftur mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 15. mai 2014:** Umsitingin legði fram ætlan og kostnaðarmeting fyri fyribilsloysn áljóðandi kr. 3,7 mió við øllum. Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Sigrún Mohr og Bogi Andreasen mæla til at játta 3,7 mió til endamálið av kontu 5775 L57016 golfvøllur, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at játta upphæddina av íløguætlanini fyri 2014 til golfvøllin, umframt at upphæddin til golfvøllin verður játtað á íløguætlanini 2015. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

# 136/14 Gunnar Hoydal vegna Tórshavnar Bátafelag : Umsókn um byggiloyvi til nýbygging á matr. nr. 177b, Tórshavn (2009-1502)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 201/14 | 14/00348-66 |
| 2 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 184/14 | 14/00348-66 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 136/14 | 14/00348-66 |

## Málslýsing:
Í sambandi við nýbyggingina av felagshúsum til Bátafelagið, varð avgjørt, at gamli farvegurin millum økið undir Bryggjubakka og vegin omanfyri á Bryggjubakka/Bringsnagøtu gjøgnum eina trappu, skuldi varðveitast, men loyvi varð givið til, at gamla trappan varð tikin niður, og nýggj sett upp í staðin.

Á fundi millum borgarstjóran og Bátafelagið var spurningurin reistur, um at gera alment wc undir trappuni, og var lagt upp til at kommunan skuldi rinda fyri hetta wc.

Sambært tekning dato: 07/24/12 frá arbeiðstakaranum hjá Bátafelagnum, Sp/f Búsetur verður talan um eitt toilett við útv. máti á ca. 2,4 x 2,2 m útv. mát.

Tað framgongur ikki av tilfarinum hvussu atkomuviðurskiftini til rørslutarnaði skal verða loystur og um hetta toilettið lýkur alment galdandi reglunum um toilett til rørslutarnað.

Bátafelagið upplýsti, at teir í sambandi við útbjóðingina av byggingini av húsinum eisini høvdu fingið prís uppá gerð av umrødda almenna wc. Upprunaliga bleiv upplýst, at kostnaðurin kom at liggja um kr. 140.000, men seinni er upplýst at hann verður hægri.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Ongin játtan er til slíkt wc á íløguætlanini fyri 2014, og peningur til rakstur er heldur ikki á rakstrarjáttanini fyri 2014, tí talan er um nýtt virksemi.

Kommunan hevur tó veitt stuðul til Bátafelagið til byggingina av felagshúsið teirra.

Verður samanborið við wc í Steinatúni, sum var latið upp í fjør, kann roknast við einum árligum rakstrarkostnaði á 2-400.000 kr., alt eftir hvussu upplatingartíðirnar verða.

Vísast skal á, at starvsfólk eru sett at taka sær av rakstrinum á almenna toilettinum í Mylnugøtu og hava harumframt rakstrarábyrgd av plintunum á torginum undir Bryggjubakka. Seinasta árið er enn eitt rakstrarstað latið upp á Steinatúni uttan skipað eftirlit, og hava starvsfólkini verið noydd at átaka sær eftirlitsuppgávuna eftir førimuni har eisini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til at taka støðu til, um kommunan skal rinda fyri gerð av almennum wc undir trappuni við Bátafelagið, og um so er at vísa á neyðuga fígging umframt árliga rakstrarfígging framyvir.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Ásannandi, at tað eru onnur almenn wc í kommununi, sum ikki hava nøktandi rakstrarfígging, og at hetta avmarkar upplatingartíðir og tænastustøði v.m.

og at tørvur er á wc aðrastaðni í kommununi eisini, samtykti nevndin at mæla býráðnum frá at gera íløgu í nýtt wc við Bátafelagið, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt at fíggja kostnaðin og skipa virksemi innan verandi rakstrarkarmar.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

# 137/14 Áheitan frá Annfinni Hjelm um at fáa vegin á Heygnum Mikla gjørdan lidnan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 98/14 | 14/00377-4 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 125/14 | 14/00377-4 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 137/14 | 14/00377-4 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Í teldubrævi, dagfest 10. mai 2012, til kommununa vísir Annfinn Hjelm á, at vegurin á Heygnum Mikla er í ringum standi. Hann ynskir, at vegurin verður gjørdur liðugur.

Greitt verður frá málinum.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin var á staðnum og kunnaði seg um viðurskiftini.

Nevndin samtykti, at umsitingin letur gera kostnaðarmeting at dagføra vegin, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Vegurin á Heygnum Mikla hevur eina samlaða vídd á umleið 1420 m². Samlaða longdin er uml.170-180 m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Eingin peningur er játtaður til projekteringina og tískil ber illa til at gera eina kostnaðarmerting grundað á eitt skitsuprojekt. Verður harafturat roknað við einum vegleiðandi meturprísi álj. kr. 20.000,-/m, verður samlaði kostnaður fyri vegastrekkið uml. 3.5 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at málið verður viðgjørt politiskt í sambandi við raðfesting av íløgum á langtíðar íløguætlan kommununar.

**Tekniska nevnd 22. november 2012:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Maria Hammer Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Jákup Símun Simonsen, mælir til at gera ábøtur á vegin, fíggjað av rakstri í 2013.

Jákup Símun Simonsen ynskir málið fyri býráðið.

**Býráðið 13. desember 2012:** Einmælt samtykt at beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Eingin peningur er játtaður ella avsettur til hetta vegarbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at raðfesta arbeiðið á langtíðar íløguætlanini.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

# 138/14 Matr. nr. 1091. Eigarar: Torstein Holm (2013-2068)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.03.2014 | 34/14 | 14/00615-5 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.03.2014 | 70/14 | 14/00615-5 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 138/14 | 14/00615-5 |

**Málslýsing - samandráttur**
Eigarar eru: Torstein Holm, Turid Holm,Kári Holm.

Matrikulin er býttur upp í 3 partar. Sí kortskjal. 2013-2068/2.

Eigararnir ynskja at makaskifta við kommununa soleiðis:

Umleið 965m2 ( Hornið – Undir Gráasteini/Kirkjubøarvegur ) verða við marknaðarumskipan lagdar afturat partinum sum liggur millum Kirkjubøarvegnum og Velbastaðvegnum.

Kommunan kemur sostatt at eiga trýkantin Undir Gráasteini/Kirkubøarvegnum. matr. nr. 1091 (parturin sum liggur millum Kirkjubøarvegin og Velbastaðvegin) fær tá vegaatgongd frá Velbastaðvegnum.

Eigararnir av matr. nr. 1091, ynskja at kommunan ásetir markið við atliti til Velbastaðvegin.

**Tilmæli**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at beina málið í teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
**Viðmerkingar frá teknisku deild:**
Luturin av matr. nr. 1091, norðan fyri Kirkjubøarvegin, sum stendur kommununi í boði at ogna sær við makaskifti, er so nær landsvegnum, at meginparturin er innanfyri 25 m byggilinjuna frá vegmiðjuni á landsvegnum, og hevur luturin eisini so óregluligt skap, at ivasamt er, um kommunan kann nýta lutin til nakað.

Roknast kann við, at luturin av matr. nr. 1091, hjá umsøkjarunum, sum liggur sunnan fyri Kirkjubøarvegin, kemur at hava atkomu frá Velbastaðvegnum, umleið miðskeiðis á stykkinum, samskipa við verandi atkomur hinumegin Velbastaðvegin og kann møgulig marknaumskipan takast upp, tá íbinding í Velbastaðvegin gerst ítøkilig.

**Viðmerkingar frá løgdeildini:**
Uppskot til makaskifti fyriliggur, sí kortskjal.
Kommunan yvirtekur uml. 965 $m^2$, (Hornið undir Gráasteini/kirkjubøarvegur) og part av matr. nr. 1091, niðan fyri Kirkjubøarvegin, og fáa eigararnir aftur fyri eitt øki oman til Velbastaðvegin.

Fyri eigararnar verður talan um eitt størri samanhangandi øki niðan fyri Kirkjubøarvegin, og fær hesin parturin av matriklinum vegaatgongd frá Velbastaðvegnum, sum er kommunalur vegur.

Kommunan fær eitt øki niðan fyri Velbastaðvegin, sum er betri í skapi í mun til eina møguliga framtíðar útstykking á økinum.

Eitt møguligt makaskifti skal góðkennast av Almannaráðnum.

Makaskifti er soleiðis:
1. 1091 letur umleið 949 + 318 = 1267 fermetrar til matr. 1090.
2. 1090 letur umleið 1165 fermetrar til matr. 1091.

**Viðmerkingar frá teknisku deild:**
Samskifti hevur verið við Landsverk um viðurskiftini á landsvegnum. (sí j. nr. 2013-2068/4. Víst verður á, at tað ongar ætlanir eru um at dagføra íbindingarnar til Kirkjubøarvegin, men at Landsverk ætlar at dagføra sjálvan Kirkjubøarvegin við sjálva íbindingina til Marknagilsvegin. Víst verður til mál nr. 2013-2921.

**Viðmerkingar frá býarskipanardeildini:**
Matr. nr. 1091 liggur innanfyri stóra B3 økið, ætlað til smá vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og til vinnuvirksemi, ið hevur samband við hesi. Grundøkini skulu verða minst 800 m² og í mesta lagi 2000 m² til víddar.

Stórur partur av hesum B3-økinum er útstykkjað og bygt, meðan økið millum gamla Velbastaðvegin og Kirkjubøvegin ikki er útstykkjað. Mælt verður til, at ein útstykkingarætlan verður gjørd fyri henda partin av B3-økinum við tí fyri eyga, at útvega størri økir til vinnuligt virksemi innan karmar av ásetingunum fyri B3-øki í almennu byggisamtyktini, og vísir í hesum sambandi til tilmæli í máli nr. 14/00684, til fundin í teknisku nevnd 12. mars 2014..

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla frá at makaskifta soleiðis sum søkt er um, vísandi til at niðari partur av matr. 1091, sum liggur millum Kirkjubøarvegin og undir Gráasteini, ikki kann brúkast til byggilendi ella líknandi.

Hinvegin verður mælt til, at Tórshavn kommuna tekur upp samráðingar við umsøkjaran at keypa alla ognina matr. 1091 og við eigaran av matr. nr. 1092, við tí fyri eyga at gera eina samlaða útstykkingarætlan til vinnuendamál, sum fevnir um matr. nr. 1090 hjá Tórshavnar kommunu (5279 m²), matr. nr. 1091 hjá umsøkjaranum (4307 m²), og matr. nr. 1092 hjá øðrum privatum eigarum (13.668 m²).

Tekniski stjórin mælir til, at kommunan arbeiðir við øðrum møguleikum fyri loysnum, at útvega størri økir til vinnuligt virksemi innan karmar av ásetingunum fyri B3-øki í almennu byggisamtyktini, og vísir í hesum sambandi til tilmælið í máli nr. 14/00615, og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. mars 2014:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevnd 19. mars 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

# 139/14 Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 16.06.2014 | 28/14 | 14/00896-7 |
| 2 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 166/14 | 14/00896-7 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 139/14 | 14/00896-7 |

**Málslýsing:**

**Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki.**
Seinasta stóra havnaútbyggingin í Tórshavn, var liðug í 1997, tá tann uttasti parturin av molanum varð breiðkaður. Hendan útbyggingin bleiv gjørd í tøkum tíma, tí bingjuflutningurin er støðugt vaksin síðani.

Síðani útbyggingina í Tórshavn í 1997, er havnarlagið í Kollafirði munandi útbygt. Útbyggingarnar í Kollafirði og á Oyrareingjum hava skapt nógv virksemi. Tørvurin á størri útbyggingum er ikki akuttur í løtuni, men hann kann vísa seg seinni.

Undantikið tað, sum verður uppskipað á Oyrareingjum, kemur allur innflutningur til Føroyar, sum kemur við bingjum og trailarum, um bryggjuna í Tórshavn. At bingjuhavnin liggur í Tórshavn ger, at flutningurin til nógv tann størsta partin av forbrúkarunum er stuttur.

Verðandi umstøður á Eystaru bryggju eru langt frá optimalar, tí:

- **Dýpið fram við Eystara mola og innsiglingin er ov lítið**. Hetta viðførir at tá verðandi bingjuskip liggja við bryggju, er neyðugt at leggja fendarar millum skipið og bryggjuna. Hetta er ikki nøktandi, og ger tað ómøguligt at fáa størri bingjuskip til bryggju, enn tey verðandi. Alt fleiri ferðamannaskip, sum sigla á okkara leiðum, kunnu ikki koma til bryggju, tí dýpið er ov lítið.
- **Kajplássið, serliga um summarið, er sera avmarkað.** Hetta merkir at vit ikki kunnu avgreiða ferðamannaskipini og bingjuskipini samstundis, og tað er ómøgulig at vaksa um møguligt annað virksemi.
- **Økið til bingjur og trailarar er ov lítið.** At økið til bingjur og trailarar er ov lítið, viðførir at arbeiðsgongdin ikki er nøktandi og tað blíva alt ov nógvar flytingar.
- **Økið til pakkhús o.a. er ov lítið.** Fyri ikki at minka um verðandi bingjuøki, ber ikki til at byggja goymslubygningar o.a. sum tørvur er á til havnavirksemið.
- **Økið til avgreiðslu av ferðafólki og bilum er ov lítið.** Tað er ov lítið pláss at avgreiða ferðafólk og bilar, serliga um summarið. Ein víðkan av havnaøkinum, hevði gjørt tað møguligt at umskipa økið rundan um farstøðina, soleiðis at betri pláss var til tey ferðandi.

Einasti møguleiki at betra munandi um umstøðurnar á Eystaru bryggu í Tórshavn, er at leingja molan á Skansabryggjuni, og at víðka verðandi øki suðureftir og eystureftir.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til:
- at býráðið velur 2 býráðslimir í bygginevndina
- at bygginevndin ger byggiprogram.
- beinanvegin at seta í verk árinskanning, hydrauliskar kanningar og at fáa til vega neyðug loyvir.

- at kanningar og fyrireikingar, upp til 3 mió. verða goldnar av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn.

**Vinnunevndin 30. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 30. mai 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við vinnunevndini.

**Býráðið fyri læstum hurðum 30. mai 2013:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið í teknisku nevnd, ið fall við einari atkvøðu fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Hela Dam á Neystabø og Jákup Dam

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.
Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Elin Lindenskov, Hela Dam á Neystabø og Jákup Dam

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

At enda varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at velja Sjúrður Olsen og Tróndur Sigurdsson í bygginevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov.

**Bygginevndin hevur havt 10 fundir, og hevur hesar viðmerkingar:**

**Grótbrot:** Grótið til uppfyllingina, sum er umleið 80.000 $m^2$ verður tikið á sama stað sum til seinastu havnaútbyggingina, við at víðka verðandi grótbrot á Glyvursnesi suðureftir.
Yvirfriðingarnevndin hevur góðkent, at grótbrotið verður víðkað.
Avtala um gróttøku er ikki gjørd við Búnaðarstovuna enn.

**Aldusimuleringar:** DHI hevur gjørt aldusimuleringar av, hvussu kyrt tað verður í tí nýggju- og verðandi havnini , tá útbyggingin er liðug. Kanningarnar vísa, at kyrran í tí nýggju havnini verður umleið tann sama, sum tað er í verðandi havn í dag. Kanningin vísir eisini, at aftan á ýtbyggingina, verður tað munandi kyrrari í verðandi havn.
Útbyggingin hevur eisini ein positiva ávirkan á Álaker og Argir, serliga á landnyrðingi.

**Grótkast:** Fyri at kunna taka støðu til hvussu sjálvt grótkastið skal byggjast , eru ávegis kanningar gjørdar hjá DHI.
Ávegis kanningarnar vísa, at tann norðari parturin av grótkastinum skal vera nakað hægri enn verðandi moli.

Fyri at fáa endaliga staðfest, hvussu uppbyggingin av molanum skal verða, er neyðugt at gera eina modelroynd, sum verður liðug í september 2014.

**Sandagerð:** Kanningar vísa, at útbyggingin ikki hevur nevniverduga ávirkan á sandin í Sandágerði.

**Havnalagið:** Fyri at fáa skapið á havnalagnum at hóska so væl til landslagið sum til ber, er nógv orka, saman við arkitekti, brúkt upp á at fáa tað rætta skapið.
Uppskotið er ein samlað víðkan av havnalagnum upp á umleið 163.000 $m^2$, við einari atløgusíðu upp á umleið 700 m

**Skansin:** Fyri at fáa eina so góða loysn sum til ber, hevur verið samskift við Fornminnisnevndina.
Tað hevur verið týdningarmikið, at umhvørvið rundan um Skansan, aftan á útbyggingina, skal verða eitt trivnaðarøki.
Nýggja havnalagið er umleið 50 m leyst av fjøruni undir Skansanum, har møguleiki er at leggja smábátar.

**Friðingarmyndugleikar:** Yvirfriðingarnevndin hevur á fundi 10. juni 2014 samtykt at geva loyvi til útbyggingina.

**Árinskanning:** Tá bygt verður so út á sjógv, er neyðugt at gera eina árinskanning. Hetta er ein umfatandi kanning, sum lýsir hvørja ávirkan útbyggingin hevur á umhvørvið.
Rambøl hevur gjørt kanningina, sum aftaná at býráðið hevur samtykt tað, verður send til umhvørvisstovuna.
Tað er Umhvørvisstovan sum endaliga góðkennir ætlanina.

**Broyting av byggisamtykt:** Neyðugt verður at víðka verðandi byggisamtykt til eisini at fevna um nýggja havnalagið. Uppskot um hetta, eigur sum skjótast at verða lagt fyri nevnd.

**Framhaldandi fyrireiking:** Fyri at kunna gera tær endaligu fyrireikingarnar áðrenn støða verður tikin til at projektera, er neyðugt at gera modelroynd av nýggja molanum.
Eisini er neyðugt at gera byggiprogram.
Tað eru áður jattaðar 3 mió til fyrireikingar. Neyðugt er at játta 1 mió. afturat, soleiðis at møguligt er gera modelroyndina og byggiprogrammið.
Hetta arbeiðið eigur at verða liðugt í oktober.

**Tilmæli:**
Havnameistarin og bygginevndin mæla til at samtykkja, at VVM kanningin verður send til Umhvørvisstovuna til góðkenningar, tá hon er liðug.
Mælt verður eisini til at játta 1 mió. av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn til fyrireiking og ger av byggiprogrammi.

**Vinnunevndin 16. juni 2014:** Samtykt taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið í teknisku nevnd, fall við 3 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge og Jákup Dam

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø og Sigrún Mohr,

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam

Ímóti atkvøddu: Marin Katrina Frýdal.

# 140/14 Stuðul til felagshús á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 64/14 | 14/02134-13 |
| 2 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 110/14 | 14/02134-13 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 102/14 | 14/02134-13 |
| 4 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 140/14 | 14/02134-13 |

## Málslýsing:

Argja Bóltfelag arbeiðir við ætlanum um at innrætta hæddina undir áskoðaraplássunum í AB-skýlinum, har gerast skulu umklæðingarrúm, goymslurúm og felagshøli. Í hesum sambandi hevur Argja Bóltfelag søkt um stuðul frá Fótbóltssambandi Føroya, og í skrivi, dagfest 13. desember 2012, varð boðað frá, at Fótbóltssambandið stuðlar AB við kr. 600.000 til nýtt felagshús á Argjum.

Síðani vendi Argja Bóltfelag sær til Tórshavnar kommunu um stuðul til arbeiðið. Tórshavnar kommuna hevur fingið kostnaðarmeting og tekningar frá Argja Bóltfelag, og samlaði kostnaðurin verður sambært kostnaðarmetingini kr. 8.264.239,50, íroknað 25% mvg.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Samtykt at viðgera málið saman við íløguætlanini 2014.

**Ískoyti:**
Argja Bóltfelag heitir á kommununa um at fáa stuðul til at gera partar av arbeiðinum at innrætta skýlið til tess ikki at missa stuðulin frá FSF kr. 600.000.

Felagið hevur fingið tilboð uppá planering, stoypa gólv, múra rest av útveggum til almenn wc og goymslu/fýrrúm í báðum endunum, allar hurðar og øll vindeygu, øll innandura kloak- og frárensluviðurskifti og hitarør, og lutvíst rør til heitt og alt vatn. Tilboðið er kr. 1.178.530 u/mvg. Arbeiðið er mett at vera liðugt síðst í januar 2014.

Felagið bjóðar sær standa fyri arbeiðinum og søkir um kr. 600.000 í stuðli.

Tá hetta arbeiðið er gjørt, verður næsta stig liðugtgerð av báðum endunum, herundir at gera almennu wc-ini, hitaverk og rottanga. Eftir tað kunnu umklæðingarrúm v.m. gerast so hvørt fíggingin er tøk.

Treyt fyri stuðli er, at kommunan fær endaligan byggiroknskap til góðkenningar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 600.000 í stuðli av kontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Mentamálanevndin 27. november 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 4. desember 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 600.000 í stuðli av konto 5370 Stuðul til íløgur og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 12. desember 2013:** Einmælt góðkent, at Sjúrður Olsen fór av fundi, meðan málið varð viðgjørt.

Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at stoypa, planera v.m. sum omanfyri lýst er gjørt. Harumframt hevur kommunan grivið nýggja leiðingsgrøv til kloakk, vatn, el, fipur v.m. umframt annað lendisarbeiði fyri kr. 660.000, sum ætlanin hevur verið skal býtast javnt millum íløgujáttan til AB-skýlið og rakstrarkontu á teknisku fyrisiting.

AB søkir nú um at halda fram við arbeiðinum við at innrætta sjálvan bygningin, samlað kostnaðarmeting við innheintaðum tilboðsprísum er kr. 5,4 mió u/mvg. Talan er um fýra umklæðingarrúm, dómararúm, almenn wc v.m. og felagshøli. Partur av útreiðslunum er til innbúgv o.a. uml. kr. 200.000. Upplýst er kommununi, at AB hevur søkt FSF um stuðul til liðugtgerð av skýlinum.

Á íløguætlanini fyri 2014 er játtan kr. 4,2 mió tøk til ítróttarøkið á Argjum. Helvtin av teim áðurnevndu kr. 660.000 ætlast fíggjað av hesi játtan, eftir eru sostatt kr. 3.870.000, sum íroknað kommunalt mvg er 67% av tilboðskostnaðinum.

Skal AB standa fyri arbeiðinum, er neyðugt at fáa upplýst, hvussu felagið ætlar at fíggja írestandi upphæddina kr. 1,5 mió. Umframt stuðul frá FSF, hevur felagið lagt upp til fígging við sjálvbodnum arbeiði.

Treytir:
Kommunan skal tí seta sum treyt fyri fígging ella stuðli, at talan er um endaligan stuðul til byggingina, at felagið upplýsir, hvussu írestandi upphæddin verður fingin til vega, og at øll neyðug byggiloyvi og myndugleikaloyvi annars eru fingin til vega, áðrenn byggingin byrjar.

Eisini verður at seta sum treyt, at umboð fyri kommununa tekur lut á øllum projektfundum, og at stuðul verður goldin út à conto eftir umbøn fyri gjørt og váttað arbeiði. Harumframt er krav, at stuðul verður fluttur bert um serstaka byggikontu uttanfyri raksturin hjá felagnum annars, og at endaligur byggiroknskapur verður latin kommununa at góðkenna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til

- at játta kr. 3.870.000 til at innrætta hølini undir AB-skýlinum og kr. 330.000 til gjørt leiðingsarbeiði, sum tekniska fyrisiting hevur staðið fyri, í alt kr. 4,2 mió av íløgukontu 5775 ítróttaranlegg, og
- at AB stendur fyri at fremja arbeiðið at innrætta hølini eftir omanfyri nevndu treytum.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 1. mai 2014**: Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 1. mai 2014**: Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

Annfinn Brekkstein; Bjørghild Djurhuus; Bogi Andreasen; Elin Lindenskov; Halla Samuelsen; Heðin Mortensen; Helena Dam á Neystabø; Jákup Dam; Jógvan Arge; Sigrun Mohr; Sjúrður Olsen og Tróndur Sigurðsson hava Játtað at samtykkja málið við aðru viðgerð. Marin Katrina Frýdal hevði ikki svarað tá freistin var farin. Málið verður at staðfesta á fyrst komandi býráðsfundi.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

# 141/14 Havnar Kirkja Dómkirkjan : Umsókn um yvirtøku av Arnes Minde – matr. nr. 93, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 151/14 | 14/02771-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 179/14 | 14/02771-2 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 141/14 | 14/02771-2 |

## Málslýsing:

Skriv er komið frá Kirkjuráðnum í Havnar kirkju, ið er áhugað í at ogna sær Arnes Minde. Í skrivinum verður eisini víst til býráðssamtykt frá 1993 hesum viðvíkjandi.

Ískoyti
Fundir hava verið við kirkjuráðið um møguliga sølu og treytir í hesum sambandi.
Enn eru partarnir ikki samdir um prís.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til viðgera møguligar treytir og sølupris og at selja kirkjuráðnum Arnes Minde.

Tilfar um málið verur framlagt á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at heimila umsitingini at samráðast um sølu av húsunum fyri ein minstaprís áljóðandi 4 mió. kr. At leggja fyri býráðið, tá ið avtala fyriliggur.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við keyparan. Umsitingin og keypari samdust um ein keypsprís áljóðandi kr. 3,5 mill. kr.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at fíggjarnevndin umvegis býráðið, samtykkir at selja ognina til Havnar Kirkju, fyri 3,5 mill. kr.

Sølan er treytað av góðkenning frá Almannaráðnum. ( Føroya Landstýri )

Kirkjuráðið yvirtekur húsini sambært nærri avtalu við kommununa.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

# 142/14 Fíggjarstøðan á konto 8210 (gøtuljós) fyri rakstrarárið 2014

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 174/14 | 14/02987-4 |
| 2 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 190/14 | 14/02987-4 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 142/14 | 14/02987-4 |
| 4 Býráðsfundir | | | 14/02987-4 |

## Málslýsing:
Seinastu 5 árini er játtanin til konto 8210 "Gøtuljós" hækkað við kr. 373.000, meðan útreiðslur til SEV sama tíðarskeið eru hækkaðar áleið 1,4 mió. kr.

Fyri at klára sínar skyldur, hevur konto 8210 hetta tíðarskeið fingið 1,156 mió. kr. frá øðrum konti, 6110 og 6710.

Pr. 1. mai í ár eru 47% av samlaðu játtanini á 7,331 mió. kr. brúkt, svarandi til eitt yvirtrekk á 1 mió. kr.

Høvuðsorsøkin er einaferð enn SEV-rokningin. Eykarokning á u.l. ½ mió. kr er komin fyri meirnýtslu í 2013 og er samlaði fíggjartørvurin gøtuljós 8210 álj. kr. 700.000,-. Vísast skal tó á, at umsitingin í sambandi við fíggjarætlanina fyri bæði 2013 og 2014 hevur gjørt vart við avleiðingarnar av hækkaðu el-prísinum. Av tí at talan er um viðurskifti, sum kommunan ikki hevur ávirkan á, ber ikki til at síggja burtur frá hesum hækkaðu útreiðslum og framhaldandi at undirbudgettera. Hetta førdi til, at kto 8120 hevur fingið tillutað framflutt avlop frá 2013 av álj. kr.- 300.000,- av aðrari konto, og er fíggjartørvunin fyri gøtuljós fyri 2014 sostatt munurin - kr. 400.000,-.

Fyri at fáa útvegað fígging til tær omanfyri kr. 400.000,-, kundi ein loysn verið at gjørt fyriliggjandi flytingar:
1) Fluttar verða kr. 100.000,- av kto 6710 til kto 8210
2) Fluttar verða kr. 100.000,- av kto 6810 til kto 8210
3) Fluttar verða kr. 200.000,- av kto 8112 til kto 8210

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri vatn- & gøtuljósdeildina mæla til, at eykajáttan á kr. 400.000 verður veitt konto 8210 fyri fíggjarárið 2014 eftir hesum flytingum:
1) Fluttar verða kr. 100.000,- av kto 6710 til kto 8210
2) Fluttar verða kr. 100.000,- av kto 6810 til kto 8210
3) Fluttar verða kr. 200.000,- av kto 8112 til kto 8210

Somuleiðis verður mælt til, at býráðið tekur atlit til hækkaðu orkuprísirnar í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2015, og at játtanin til gøtuljós verður hækkað við uml. kr. 700.000 til keyp av el.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum at:
1) Fluttar verða kr. 100.000,- av kto 6710 til kto 8210
2) Fluttar verða kr. 100.000,- av kto 6810 til kto 8210

3) Fluttar verða kr. 200.000,- av kto 8112 til kto 8210

og at beina málið í fíggjarnevndina.

Eisini samtykt at mæla býráðnum til at hækka konto 8210 (gøtuljós) fyri 2015 við kr. 700.000.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt at taka undir við at:

1) Fluttar verða kr. 100.000 av konto 6710 til konto 8210
2) Fluttar verða kr. 100.000 av konto 6810 til konto 8210
3) Fluttar verða kr. 200.000 av konto 8112 til konto 8210

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

# 143/14 Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 200/14 | 14/03118-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 191/14 | 14/03118-2 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 143/14 | 14/03118-2 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við ætlaðu byggingina kring skúladepilin í Marknagili verður roknað við nógvari øktari ferðslu. Væntast kann eisini, at útstykkingarbyggingar oman fyri Marknagilsvegin fara at gera sítt til øktu ferðsluna. Harnæst kann væntast økt ferðsla til Argir, tá brúgvin um Sandá verður tøk seinni í 2016.

Sambært frágreiðingum frá 2006, ið umsitingin hevur latið gera saman við ráðgeva frá Rambøll ísv. heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu, verður m.a víst á ein framtíðar tørv fyri ‘trafikafvikling’ grundað á framskrivingum av ferðslutrýstinum. Í hesum sambandi verður brúk fyri at gera eina ítøkiliga ferðsluanalysu av ferðsluviðurskiftunum, sum m.a. skal lýsa støðuna í dag og hvussu verður, tá alt skúlaøkið verður fult útbygt.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Umsitingin hevur fingið eina kostnaðarmeting áljóðandi kr. 70.000,- u/mvg fyri arbeiðið. Afturat hesum koma útreiðslur fyri ferðaútreiðslur og fundarvirksemi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum og at játta kr. 125.000 til kanningararbeiðið av konto 8175 Aðrar vegaverkætlanir.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

# 144/14 Advokatskrivstovan : Umsókn vegna Siggu og Niclas Rasmussen og Monu Rasmussen Mohr um at avlýsa serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 61a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 175/14 | 14/03172-2 |
| 2 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 144/14 | 14/03172-2 |

## Avtøka av serstøku byggisamtykt fyri matr. nr. 61a, Argir

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Umsókn frá Fríðu Patursson adv. Vegna eigararnar av matr. nr 61a, Argir, um avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr.61a, Argir.

Býarskipanardeildin gjørdi í 2010, saman við eigarunum av matr. nr. 61a, Argir, uppskot til eina serstaka byggisamtykt fyri ognina, sum tey høvdu arva. Ognin er 1398 $m^2$ til støddar og liggur í A1-øki, sum sambært almennu byggisamtyktini m.a. kann brúkast til samanbygd hús við grundøkið uppá minst 300 $m^2$ ella stakhús við grundøkið uppá í minsta lagi 500 $m^2$. (J nr. 2010-1285)

Uppskotið til serstaka byggisamtykt gekk út uppá, at byggjast skuldu 3 samanbygd hús og eitt felagsøki, soleiðis at teir 3 arvingarnir fingu hvør sítt hús. Uppskotið var samtykt av býráðnum tann 25. november 2010 og serstaka byggisamtyktin var endaliga góðkend 10. mai 2011.

Nú eru umstøðurnar broyttar soleiðis at ætlanin um at byggja trý samanbygd hús er slept. Tí søkja tey nú um at fáa serstøku byggisamtyktina avtikna og bert býta ognina í tvey grundøkir, sum eru størri enn 500 $m^2$.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at góðkenna avtøkuna av serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 61a, Argir, og at beina málið í býráðið.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

# 145/14 Bygging av dagstovni í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 10.06.2014 | 30/14 | 14/03251-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 175/14 | 14/03251-1 |
| 3 Býráðsfundir | | | 14/03251-1 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | | | 14/03251-1 |
| 5 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 145/14 | 14/03251-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður eisini til mál 14/01859. Nú byggisamtyktin fyri ætlaða økið við Botnánna til nýggja dagstovnin er góðkend av landsstýrinum, er klárt at fara í gongd við at fyrireika byggiverkætlanina. Fyrsta stig er at fáa til vega kravspesifikatión og byggiskrá fyri nýggja stovninum.

Á íløguætlanini fyri 2014 eru kr. 14 mió settar av til nýggjan dagstovn í Kollafirði. Áður eru játtaðar kr. 1,5 mió til keyp av grundøkið og fyrireikingar v.m. Mett verður, at fíggjartøvur til fyrireikingar, kravspesifikatión, byggiskrá og útbjóðingartilfar er kr. 1 mió.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta kr. 1 mió av íløgukontu 3175 Dagstovnur í Kollafirði til nevndu fyrireikingar.

**Trivnaðarnevndin 10. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt at játta 1 mió. av konto 3175 til fyrireiking av dagstovni í Kollafirði, at bjóða dagstovnin út í umvendari licitatión og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

# 146/14 Brúgvin um Sandá

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 146/14 | 14/00090-262 |

## Málslýsing:

Bygginevndin mælir til at taka undir við framløgdu kostnaðarmeting og at taka av tilboðnum um brúgv frá J&K Petersen, og somuleiðis at játta meirkostnaðin fyri rundkoyringar í samlaðu játtanini.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Útsett.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein samtykkja at taka av tilboðnum hjá J&K Petersen á kr 59.802.746, og seta av kr 58.583.973 á íløguætlaninni í 2015, og at heimila umsitingini at samráðast víðari um endaligan sáttmála.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Jógvan Arge taka støðu á einum seinni fundi.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Útsett.

# 147/14 Val av limum í nevndina fyri M.A.Jacobsens virðislønina fyri 4 ár (2012-2853)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 120/14 | 14/03013-3 |
| 2 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 147/14 | 14/03013-3 |

## Málslýsing:

Sambært reglugerðina fyri nevndina velur Rithøvundafelag Føroya ein lim, Fróðskaparsetur Føroya (setursráðið) ein lim og Tórshavnar býráð 3 limir.

**Býráðið 29. november 2012:** Vald vórðu Maria H. Olsen, Erling Isholm og Jákup Jacobsen.

**Ískoyti:**
Maria H. Olsen er flutt uttanlands.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Valdur varð Hanus Kamban.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Valdur varð Heri Dam.

# 148/14 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |

## Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 m$^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 m$^2$ og 20.000 m$^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum.
Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

# 149/14 Hallarætlanir fyri Landavegin, Gundadal og Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 30.01.2014 | 17/14 | 14/00942-5 |
| 10 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 153/14 | 14/00942-5 |
| 2 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 7/14 | 14/00942-5 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 42/14 | 14/00942-5 |
| 4 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 62/14 | 14/00942-5 |
| 5 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 92/14 | 14/00942-5 |
| 6 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 93/14 | 14/00942-5 |
| 7 Mentamálanevndin | 11.06.2014 | 130/14 | 14/00942-5 |
| 8 Fíggjarnevnd | 24.06.2014 | 201/14 | 14/00942-5 |
| 9 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 149/14 | 14/00942-5 |

**Málslýsing:**

**Hallarætlanir fyri Landavegin, Gundadal og Argir**

- Upprit kemur til fundin**.**

**Mentamálanevndin 10. september 2013:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina um at útvega kostnaðarmeting fyri dupulthøll við Landavegin, sum lýkur ásetingar í mun til altjóða dystir og krøv til multi funktionalitet innanfyri eina viku.

**Ískoyti:**
Í íløguætlanini fyri 2014 eru settar kr. 9 mió av til tvíhøll (dupulthøll) við Landavegin. Sambært samtyktini hjá mentamálanevndini skal talan verða um fleirfunktionella høll, sum lýkur ásetingar til altjóða dystir. Hugsað er her um serstakliga hondbólt og flogbólt, ið krevja ávísa hædd.

Frælsafeløgini Bragdið og Hvirlan eins og sersambandið fyri frælsar ítróttir í Føroyum (FÍF) hava víst kommununa á ynski um at tryggja frælsu ítróttini innandura umstøður í høllini, tí tørvurin á støðugari venjing um veturin uttan mun til illveður og hálku er alneyðugur. Feløgini vísa á loysnir í eitt nú Svøríki, sum ikki krevja so nógv pláss og sum kunnu skipast saman við høllini (vøllunum) og ítróttavirkseminum annars.

Tað samlaða grundøkið matr. nr. 917 er lutvíst planerað. Til eina tvíhøll skal allur matrikkulin planerast, og hetta arbeiðið kann gerast nær sum helst. Økið er skipað sum D2 øki, tvs. ítróttaøki. Talan kann gerast um skipa økið í serstakari byggisamtykt, alt eftir, hvussu stór høllin verður.

Neyðugt er at viðgera nærri og ítøkiligera, hvat høllin skal rúma bæði av ítróttaumstøðum, felagshølum, fleirfunktionalietum so sum flytførar tribunir, skilja/leggja saman hallir, sjónvarping, stevnir, parkerings- og atkomuviðurskifti v.m., eins og møguleikan at byggja og taka í nýtslu bygningin í stigum. Harumframt at fáa gjørt eina kostnaðarmeting.

Til tess at ítøkiligera ætlanina er neyðugt við játtan at fyrireika eitt konseptuppskot at leggja fyri nevndina aftur sum grundarlag at útvega byggiskrá og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 0,5 mió av íløguætlanini fyri 2014 konta 5775 Ítróttarhøll við Landavegin til fyrireikingar.

**Mentamálanevndin 8. januar 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 30. januar 2014:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum við tí ískoyti, at beina málið aftur í mentamálanevndina við tí setningi, at gera eina heildarætlan sum eisini umfatar Argir, Hoyvík og Gundadal.

- Forkvinnan ynskir viðgerð av møguligari raðfesting av hallarbyggiætlanum.

**Býráðsfundir 30. januar 2014**: Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum við tí ískoyti, at beina málið aftur í mentamálanevndina við tí setningi, at gera eina heildarætlan sum eisini umfatar Argir, Hoyvík og Gundadal.

**Mentamálanevndin 12. februar 2014:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina um at útvega kostnaðarmeting fyri at byggja høll uppí Gundadalshøllina.

**Ískoyti:**
Sambært endurskoðaðu íløguætlanini fyri 2014 eru kr. 19 mió settar av til yvirtøku og at byggja út Gundadalshøllina til tvíhøll.

Feløgini Neistin, Kyndil og Fleyr eiga og reka verandi Gundadalshøll. Í skrivi dagf. 18. februar 2014 boða tey frá, at tey taka fult undir við ætlanini at útbyggja Gundadalshøllina og avhenda verandi høll við ávísum treytum til tess at tryggja feløgunum innivist í høllini.

Sett verður sum treyt, at býráðið ognar sær verandi høll fyri kr. 600.000 til hvørt felagið sær, sum er tað, sum Gundadalshøllin er bókførd fyri í roknskapunum hjá feløgunum, og at bygd verður dupulthøll við felagshølum til Neistan, Kyndil og Fleyr í norðara enda á nýggju høllini. Hvørt felagshøli skal rúma 40 fólkum at sita og haraftrat tekøkur, skrivstovuhøli, vesi og internet. Og at í høllini verða rúm til bóltar, ítróttaútgerð annars og fysioterapi umframt vektrúm, og at skilaveggur, sum er ljóðdoyvdur, verður ímillum báðar vøllirnar, smu kann dragast frá.

Harumframt treyt, at feløgini og kommunan avtala skrivliga, at feløgini hava heimarætt í høllini og fáa atgongd til fleiri kommunalar tímar enn nú. Víðari, at hallarvørður eigur burturav at verða settur at røkja Gundadalshøllina og mæla til, at hetta verður núverandi hallarvørður. At enda, at lýsingarinntøkur av lýsingum í og uttan á høllini hava feløgini rætt til.

Á fundi 5. mars 2014 við kommununa vórðu omanfyri nevndu viðurskifti umrødd. Feløgini vóru tá sinnað at lækka yvirtøkuprísin til kr. 300.000 til hvørt felagið, men at hallarvørðurin hevur fast starvsstað í Gundadalshøllini.

<u>Viðv. yvirtøkugjaldi:</u>
Tá kommunan hevur yvirtikið aðrar ítróttarhallir, tvs. Badmintonhøllina, fimleikahøllina á Stórheyggi og Høllina á Hálsi, hevur yvirtøkan verið kostnaðarfrí, tvs. kr. 1,00 uttan mun til bókført virði. Við yvirtøkuni átekur kommunan sær allan kostnað av rakstri, øllum viðlíkahaldi

og øllum umvælingum framyvir. Í mun til Gundadalshøllina er støðan eisini tann, at kommunan umframt yvirtøkuna eisini byggir høllina út til dupulta stødd, sum tey trý upprunafeløgini fáa beinleiðis ágóða av við fleiri tímum.

Vísandi til praksis við undanfarnum yvirtøkum og vísandi til, at kommunan samstundis byggir høllina út og veitir feløgunum fleiri tímar, eigur kommunan ikki at gjalda feløgunum serstakt fyri yvirtøkuna.

Viðvíkjandi heimarætti og fleiri tímum:
Tey trý feløgini hava søguligt tilknýti til Gundadalshøllina, og tí er rímiligt at avtala, at tey hava heimarætt har. Heimarætturin eigur tó ikki at merkja einkarættur, tí onnur ítróttarfeløg skulu eisini hava rætt til tímar í Gundadalshøllini eins væl og heimarætt. Ásetast kann heldur ikki ávísur serrættur til tímar, tí tillutan av tímum verður eftir mannagongdini, har tað m.a. verður hugt eftir tørvi, stødd á felag, ítróttargrein, tímum í øðrum høllum v.m.

Í hesum sambandi eigur meting at vera gjørd, hvørja ávirkan ein høll aftrat hevur á tímatørvin hjá ítróttarfeløgum.

Viðvíkjandi hallarvørði:
Við yvirtøkuni av høllini bindur kommunan set til at yvirtaka skyldur og rættindi hjá starvssetta hallarvørði. Framyvir verður hann starvssettur í hallarumsitingini og harvið partur av hallarvarðatoyminum. Hann verður tí í útgangsstøðinum ikki at hava fast starvsstað í Gundadalshøllini.

Viðvíkjandi felagshølum v.m.:
Mett verður, at kommunan í sambandi við byggiverkætlanina kann taka atlit til felagshøli og onnur høli knýtt til sjálva ítróttarhøllina uttan tó at binda seg til kostnaðin, eisini tí, at samlaða yvirtøkan og útbyggingin hevur ein avmarkaðan fíggjarkarm uppá kr. 19 mió. Feløgini eiga at bera kostnaðin til innrætting, amboð, útgerð v.m. av møguligum felagshølum.

Viðvíkjandi nýtslu av høllini og lýsingar:
Sum tvíhøll er Gundadalshøll framvegis fyrst og fremst ein ítróttarhøll, men er eyðsæð eisini væl egnað til onnur tiltøk so sum vinnuframsýningar v.m. Reglugerð eigur at áseta aðrar almennar nýtslumøguleikar enn ítrótt, har hædd er tikin fyri, at hetta virksemi ikki skaðar høllina.

Tá um lýsingarrætt og lýsingarinntøkur í og uttan á kommunalum høllum ræður, eigur ein reglugerð at verða gjørd, sum fevnir um allar kommunalar hallir bæði innan og uttan, so reglurnar eru eins fyri allar hallir og øll feløg.

Samanumtikið
Yvirtøka av verandi høll og harvið greið ognar- og rakstrarábyrgd má metast fortreyt fyri ætlanini um Gundadalshøllina sum tvíhøll. Støðutakan til sjálva byggiverkætlanina eigur tí at bíða, til yvirtøkan er framd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at gera yvirtøkuavtalu við feløgini Neistan, Kyndil og Fleyr soleiðis:

- Yvirtøkuprísurin er kr. 1,00 til hvørt felagið
- At feløgini fáa heimarætt til Gundadalshøllina, men ikki einkarætt, tvs., at eisini onnur ítróttarfeløg hava møguleika at hava heimarætt og fáa tímar í Gundadalshøllini

- At tímatillutanin verður skipað eftir galdandi mannagongd
- At kommunan yvirtekur skyldur og rættindi hjá hallarvørðinum, og at hann verður settur í hallarumsitingini, men ikki við ávísari høll sum starvsstaði
- At kommunan í sambandi við byggiverktætlanina tekur atlit til tørv á felagshølum
- At reglugerð verður gjørd um virksemið og nýtslu av Gundadalshølini
- At reglugerð verður gjørd um lýsingar í øllum kommunalum høllum innan og uttan og býtið av inntøku

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Jógvan Arge var ikki við í viðgerðini av hesum máli.

Samtykt at taka undir við tilmælinum tó so, at avtalast kann ein yvirtøkuprísur upp til kr. 250.000 til hvørt felagið og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Jógvan Arge var ikki við í viðgerðini av hesum máli.

Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri viðmerking, at yvirtøkukostnaðurin skal rindast av løgukonto og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Jógvan Arge var ikki við í viðgerðini av hesum máli.

Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at býráðið tekur undir við tilmælinum til mentamálanevndina tann 10. apríl 2014, tí býráðið hevur ábyrgd og skyldur at viðgera øll ítróttarfeløg eins. Somuleiðis sum mælt verður til at ein støðulýsing av høllini verður gjørd. Tilmæli fall við einari atkvøðu fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddi: Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu: Helena Dam á Neystabø, Rúni Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Heðin Mortensen.

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus og Halla Samuelsen.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Jákup Dam, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen, Rúni Djurhuus og Heðin mortensen

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

**Mentamálanevndin 11. juni 2014:** Rúni Abrahamsen frá MAP arkitektum kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Kostnaðarmetingar fyri tey uppskot, ið arkitekturin á síðsta mentamálanevdnarfundi kunnaði um, verða lagdar fram.

Sáttmálauppskot um yvirtøku av Gundadalshøllini er sent Neistanum, Kyndli og Fleyr. Játtast skal fígging til yvirtøkukostnaðin samsvarandi býráðssamtykt kr. 750.000. Harumframt verður mett neyðugt við fígging til fyrireikingar av byggiverkætlanini kr. 500.000. Á íløguætlanini til endamálið eru í 2014 kr. 19 mió tøkar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta ávikavist kr. 750.000 til yvirtøkukostnaðin og kr. 500.000 til fyrireikingar av byggiverkætlanini, av kontu 5775 Høll í Gundadali.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Málið umrøtt og útsett. Jógvan Arge var ikki inni tá málið bleiv umrøtt.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Útsett.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Tikið av skrá.

# 150/14 Jákup N. Skeel Nolsøe og Øssur Skeel Nolsøe : Umsókn um at kommunan yvirtekur vegir og parkeringsøki í Grønulíð og Hvarvinum á matr. nr. 886b, Tórshavn (2008-4101)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 150/14 | 14/00688-9 |

## Málslýsing:

Eigarar av matr. nr. 886ba, Tórshavn, søkja kommununa um at yvirtaka matriklin. Talan er um veg og parkeringsøki í Grønulíð og á Hvarvinum.

Viðmerkjast skal at eigarar hava fingið endurgjald fyri keyp av lendið til parkeringsøkið.

**Tilmæli:**
Leiðarin í løgdeildini og kommunustjórin, mæla til at beina málið í teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 19. februar 2014**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í teknisku nevnd.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Umsiting kommununar hevur í notati, dagf. 26. mai 2014, støðulýst vegøkini (sí j.nr. 14/00688-6), har tað framgongur, at vegøkini eru óslitin og tekniskt í góðum standi, at støði og dygd á vegunum eru á tí støði, sum krevst fyri at vegirnir kunnu lúka ásetingarnar, í verandi almennu byggisamtyktini, um slíkar vegir.

Víst verður eisini til undanfarnar samtyktir hjá teknisku nevnd og eftirfylgjandi býráðssamtykt frá 13. september 2007 (sí j. nr. 2000-2712/13), um almennar leiðreglur fyri yvirtøku av privatum vegum, har ásett er, at privatir vegir kunnu yvirtakast, um teir, umframt at lúka treytirnar í almennu byggisamtyktini, eisini við atliti til dygd, skulu lúka vanligar tekniskar treytir og í aðrar mátar ikki eru ein natúrligur partur av privatum grundstykki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kommunan yvirtekur vegin uttan yvirtøkukostnað, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014: Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.**

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014: Samtykt og at beina málið í býráðið.**

Eigarar av matr. nr. 886ba, Tórshavn, søkja kommununa um at yvirtaka matriklin. Talan er um veg og parkeringsøki í Grønulíð og á Hvarvinum.

Viðmerkjast skal at eigarar hava fingið endurgjald fyri keyp av lendið til parkeringsøkið.

**Tilmæli:**
Leiðarin í løgdeildini og kommunustjórin, mæla til at beina málið í teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 19. februar 2014**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í teknisku nevnd.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Umsiting kommununar hevur í notati, dagf. 26. mai 2014, støðulýst vegøkini (sí j.nr. 14/00688-6), har tað framgongur, at vegøkini eru óslitin og tekniskt í góðum standi, at støði og dygd á vegunum eru á tí støði, sum krevst fyri at vegirnir kunnu lúka ásetingarnar, í verandi almennu byggisamtyktini, um slíkar vegir.

Víst verður eisini til undanfarnar samtyktir hjá teknisku nevnd og eftirfylgjandi býráðssamtykt frá 13. september 2007 (sí j. nr. 2000-2712/13), um almennar leiðreglur fyri yvirtøku av privatum vegum, har ásett er, at privatir vegir kunnu yvirtakast, um teir, umframt at lúka treytirnar í almennu byggisamtyktini, eisini við atliti til dygd, skulu lúka vanligar tekniskar treytir og í aðrar mátar ikki eru ein natúrligur partur av privatum grundstykki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kommunan yvirtekur vegin uttan yvirtøkukostnað, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

# 151/14 Samlað útbjóðing av undirhondsboð av nýggjum fótbóltsvølli í Hoyvík og útstykking við Djúpagil í Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 151/14 | 14/03366-96 |

**Málslýsing:**
Umsitingin hevur, saman við HMP Consult arbeitt við gerð av nýggjum fótbóltsvølli í Hoyvík (sí j.nr. 14/000714 og 14/01462) og eisini eini útstykkingarætlan saman við LBF við Djúpagil (sí j.nr. 14/01452). Vegna væntandi stórt yvirskot av tilfari frá vøllinum og tilsvarnadi undirskot av tilfari til útstykkingina, varð samtykt (Tekniska nevnd 30. april 2014 og Fíggjarnevnd 01. maj 2014) at bjóða bæði prosjektini út saman sum undirhondsboð, við luttøku av J&K Petersen og Articon.

Undirhondsboðini skuldu vera kommununi í hendi seinast 3. juni 2014 kl 14.00.

Úrslitini vóru hesi:
J&K Petersen kr. 24.804.771
Articon kr. 27.886.745

Ráðgevarnir hava mett um undirhondsboðini (sí j.nr. 14/03366-53 og j.nr. 14/03366-52) og mælt til at taka av lægra undirhondsboðnum frá J&K Petersen.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til at taka av tilboðnum frá J&K Petersen uppá útstykkingina Djúpagil og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum frá J&K Petersen uppá fótbóltsvøllin í Hoyvík og at játta kr. 19.047.851 av íløgukontu 5775 Vøllur í Hoyvík til hesa verkætlanina umframt stuðul frá FSF kr. 0,9 mió. og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 23. juni 2014:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, tekur støðu á seinni fundi.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at heita á umsitingina um at samráðast við tilboðsgevaran um arbeiði fyri tøku upphæddina á íløguætlanini íroknað stuðulin frá FSF kr. 9.604.000,- og leggja fyri nevndina aftur.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 25. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilboðið uppá 9.477.594 kr., og í hesum sambandi at játta kr. 9.604.000 íroknað stuðul frá FSF av íløgukontu 5775 Vøllur í Hoyvík, harumframt at játta kr. 2.500.000 kr. til keyp av lendi, mvg og óvæntað av konto fyri keyp og sølu.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Sjúrður Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
Samtykt við 11 atkøvðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Jákup Dam

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

## 152/14 Heine Lützen : Umsókn vegna Sp/f Rættará um serstaka byggisamtykt fyri sunnara enda av Skálatrøð (2013-2731)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 93/14 | 14/00831-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 195/14 | 14/00831-2 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 152/14 | 14/00831-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 25.06.2014 | 220/14 | 14/00831-2 |

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Heini Lützen hevur, vegna Sp/f Rættará, í skrivi, dagfest 11. november 2013, søkt um at fáa eina serstaka byggisamtykt gjørda fyri sunnara enda av Skálatrøð - Østrøm, Koksgarðin og Skeivapakkhús. Hetta er í sambandi við byggimálið j. nr. 14/01700, har ætlanin er at økja um nýtslustigið við at seta eitt innskotið dekk í Koksgarðin.

Sambært almennu byggisamtyktini liggur hetta økið í 2. grundumráði. Hægst loyvda nýtslustig í 2. grundumráði er 0,7, um grundøkið er 500 m$^{2,}$ og 1,05, um grundøkið er 200 m$^2$, tó er møguligt, við serstakari byggisamtykt, at víkja frá ásetingunum fyri nýtslustig fyri eitt hóskiligt avmarkað økið. Tó má nýtslustigið fyri hetta økið sum heild ikki fara uppum 1,25. Um loyvi verður givið til at gera eitt innskotið dekk í koksgarðin, verður nýtslustigið 1,42, tá er kjallarin ikki taldur við..

Um nevndin ynskir, at ein serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri omanfyri nevnda økið, sum loyvir ætlaðu umbyggingini við einum nýtslustigi omanfyri 1,25, er neyðugt at broyta almennu byggisamtyktina soleiðis, at hetta økið verður 1. grundumráði. Í 1. grundumráði má nýtslustigið ikki fara upp um 1,3, um grundøkið er 500 m$^{2,}$ og upp til 1,95, um grundøkið er hægst 200 m$^2$. Við einari serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið økjast upp til 3,0.

Umsøkjarin hevur upplýst, at endamálið við hesi broyting og innrætting av bygninginum er fyri at innrætta hæddirnar og part av Østrøms Fabrik til skrivstovuhølir til útleigan.

Upplýsast skal eisini, at umsøkjarin hevur fyrr søkt um loyvi at víðka um fermetratalið í bygninginum, við at innskjóta eitt dekk, men samtykti kommunan ikki at ganga hesum á møti. Hetta var m.a. grundað á, at bygningurin longu sum er, hevur eitt nettonýtlsustig væl omanfyri mest loyva nettonýtslustig, eins og umsøkjarin ikki hevur ávíst nakra loysn viðv. parkeringsplássum til eitt økt fermetratal og broytt virksemi.

Tórshavnar kommuna hevur í januar í ár útskrivað eina hugskots- og projektkapping fyri arkitektar um skipan av miðbýnum. Uppskotini skulu verða inni tann 15. apríl. Tí meta tekniski stjórin og býarskipanardeildin ikki at hendan umsókn, um serstaka byggisamtykt fyri eitt øki í miðbýnum, eigur at verða viðgjørd fyrr enn hugskotskappingin er liðug og vinnarauppskotið er funnið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir í fyrsta lagi frá at ganga umsóknini á møti, vísandi til at grundøkið longu frammanundan er nógv yvirbygt og umsøkjarin ikki útvegar parkeringspláss til broytta og víðkaða virksemið, og í øðrum lagi at bíðað verður við at viðgera umsóknina, til hugskotskappingin um miðbýin er liðug og avgjørt er, hvussu tann nýggja miðbýarætlanin skal síggja út.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at fara á ástaðarfund.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arkitektakappingina um miðbýin, løgdu so at siga øll innkomnu uppskotini upp til, at Skálatrøð og økið harumkring verður lagt út til útvend mentunarlig endamál. Hetta ger seg eisini galdandi fyri vinnandi uppskotið.

Býráðið hevur eisini, í sambandi við samtykt tann 23. apríl 2007 í mál nr. 2007-1042, tikið avgerð um, at feløg fáa ikki loyvi at leggja høvuðssæti til sína umsiting á Skálatrøð.

Nú ein heildarætlan fyri miðbýin fyriliggur við úrslitinum frá arkitektakappingini um miðbýin, eigur eitt so týðand øki sum Skálatrøð at fylgja hesi heildarætlan. Tað er tí í beinleiðis andsøgn við heildarætlanina fyri miðbýin, og somuleiðis við samtyktina í býráðnum 23. apríl 2007, at loyva øktari skrivstovubygging til umsitingarligt endamál á Skálatrøð. Tá ein partur av tí gomlu byggingini í Østrøm, sum kommunan hevur góðkent til mentunarligt endamál, nú eisini skal takast til skrivstovur, verður ætlaða byggingin í uppaftur størri mun í andsøgn við heildarætlanina fyri økið/miðbýin.

Umframt at umsóknin er í andsøgn við miðbýarætlanina, krevur hon harumframt umfatandi broytingar av byggisamtyktini, har byggistig og nettonýtslustig skal hækkast væl meira enn loyvt er aðrastaðni, eins og frávik skal gevast fyri kravinum um parkeringspláss. At enda skal viðmerkjast, at umsøkjarin fyrr hevur fingið noktandi svar uppá umsókn um økta bygging í verandi bygningum, við at leggja eyka dekk inn í bygningin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarskipanardeildin mæla frá at ganga umsóknini á møti, vísandi til at økið sambært heildarætlanini fyri miðbýin er ætlað til mentunarlig endamál, og at ætlaða nýtslan tískil er í andsøgn við heildarætlanina. Eisini verður víst til býráðssamtykt frá 23. apríl 2007 (j. Nr. 2007-1042). Harumframt verður mælt frá at ganga umsóknini á møti grundað á, at grundøkið longu frammanundan er nógv yvirbygt og umsøkjarin ikki útvegar parkeringspláss

til broytta og víðkaða virksemið, og at umsøkjarin fyrr hevur fingið noktandi svar uppá umsókn um økta bygging í økinum.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Nevndin samtykti at fáa eina framløgu av miðbýarætlanini, áðrenn støða verður tikin í málinum.

**Tekniska nevnd 25. juni 2014:** Nevndin samtykti, at umsitingin ger uppskot til hvussu ein serstøk byggisamtykt kann gerast fyri Skálatrøð, herundir:

- Hvussu stórt øki skal takast við í byggisamtyktina.
- Hvat innihaldið í byggisamtyktini skal verða, vísandi til vinnandi uppskotið til miðbýarætlan.
- Hvussu arbeiðið, við at gera byggisamtyktina, kann skipast.

Eisini varð samtykt, vísandi til mál nr. 14/01700, at um allur grótbygningurin "Østrøm" verður kannaður útatvendum virksemi, so sum mentunarligt virksemi, so kann nevndin loyva, áðrenn serstaka byggisamtyktin er gjørd, at tann høgi bygningurin "Koksgarður" verða nýttur til annað endamál, so sum skrivstovur og annað, treytað av, at virksemið er í samsvari við almennu byggisamtyktina.

**Tekniska nevnd 25. juni 2014:** Nevndin samtykti, at umsitingin ger uppskot til hvussu ein serstøk byggisamtykt kann gerast fyri Skálatrøð, herundir:

- Hvussu stórt øki skal takast við í byggisamtyktina.
- Hvat innihaldið í byggisamtyktini skal verða, vísandi til vinnandi uppskotið til miðbýarætlan.
- Hvussu arbeiðið, við at gera byggisamtyktina, kann skipast.

Eisini varð samtykt, vísandi til mál nr. 14/01700, at um allur grótbygningurin "Østrøm" verður kannaður útatvendum virksemi, so sum mentunarligt virksemi, so kann nevndin loyva, áðrenn serstaka byggisamtyktin er gjørd, at tann høgi bygningurin "Koksgarður" verða nýttur til annað endamál, so sum skrivstovur og annað, treytað av, at virksemið er í samsvari við almennu byggisamtyktina.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Sjúrður Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

## 153/14 Skúlabygnaður og og skúlabygging í Tórshavnar kommunu (2011-0679)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 152/14 | 14/00423-69 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.06.2014 | 198/14 | 14/00423-69 |
| 3 Býráðsfundir | | | 14/00423-69 |
| 4 Fíggjarnevnd | | | 14/00423-69 |
| 5 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 153/14 | 14/00423-69 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í álitinum Fólkaskúlin í Tórshavnar kommunu árini 2012-2021 verður skúlabygnaðurin í kommununi viðgjørdur. Skúlabygnaðurin í kommununi hevur avgerandi ávirkan á bæði íløgutørvin í verandi og nýggjar skúlar og á raksturin, serstakliga tímajáttanina til einstaka skúlan.

Skúlabygnaðurin hevur eisini avgerandi ávirkan á, hvussu undirvísingin kann skipast bæði í mun til lærugreinir, næmingar, lærarar osfr. Tað hevur í hesum sambandi stóran týdning, at skúlabygnaðurin er so skipaður, at hann stuðlar sum best undir undirvísingarliga virksemið og harvið mennir fakliga stigið.

Í álitinum er ein røð av tilmælum, sum fevna um skúlabygnaðin í allari kommununi, og sum byggja á ymisk atlit og fortreytir, ið mett verður hava størst týdning. Talan er um uppskot til ein samanhangandi bygnað, sum tí hevur ávirkan og avleiðingar fyri flest allar skúlarnar í kommununi. Samsvarandi uppskotinum um nýggja bygnaðinum setur uppskotið harumframt út í kortið, hvørjar íløgur skulu gerast komandi árini.

Størsta uppskotið er at byggja nýggjan Vesturskúla og í hesum sambandi niðurleggja Venjingarskúlan og Kommunuskúlan, og at Nám X verður sjálvstøðugur miðbýarskúli. Onnur høvuðsbroyting er at skipa forskúla í

øllum skúlum. Ein triðja høvuðsbroyting er, at skúlaskiftið verður at fylgja býtinum grunddeild (1.-3. fl.), miðdeild (4.-6. fl.) og hádeild (7.-9. fl.).

Í fólkaskúlalógini § 32 er ásett, at ein skúlabygnaður skal verða gjørdur fyri fólkaskúlan í kommununi. Sambært § 47, stk. 6 ger kommunustýrið uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum, og sambært § 52, stk. 4 viðger skúlastýrið saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum. Í teimum kommunum, har tvey ella fleiri skúlastýri eru, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk at viðgera uppskot um skúlabygnað.

Álitið um nýggjan skúlabygnað deils fyri kommununa sum heild, deils fyri einstaka skúlan, verður nú at leggja fyri skúlastýrini, og settur verður arbeiðsbólkur, har kommunan og tey 11 skúlastýrini í kommununi eru umboðað. Úrslitið av hesum verður so aftur at leggja fyri nevnd og býráð.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at álitið verður at leggja fyri skúlastýrini, og at settur verður arbeiðsbólkur umboðandi øll skúlastýri og kommununa at viðgera bygnaðaruppskotið.

**Mentamálanevndin 18. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 18. apríl 2012:** Kunnað varð um niðurstøður frá arbeiðsbólkinum, sum hevur viðgjørt álitið um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021

**Ískoyti:**
Við støði í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingunum frá arbeiðsbólkinum umboðandi skúlastýrini, hevur annar arbeiðsbólkur nú útgreinað eitt konsept fyri nýggjum Vesturskúla (sí máltal 2012-1064). Arbeiðið er fyrsta stigið í fyrireikingunum at byggja henda skúlabygning.

Í nevndu ætlan er Vesturskúlin ein trý-sporaður skúli við forskúla og frítíðarskúla, og sostatt í samsvari við bygnaðin og skúlatilboðini, sum skotin verða upp í álitinum. Trý-sporaði Vesturskúlin er saman við ætlanini at flyta Nám X úr Eysturskúlanum høvuðsfortreyt fyri, at til ber at skipa skúlabygnaðinum fyri alla kommununa eftir uppskotinum í álitinum.

Vísandi til ætlanina at byggja Vesturskúlan (máltal 2012-1064) verður mett neyðugt við politiskari støðutakan til høvuðslinjurnar í uppskotinum til nýggja skúlabygnað fyri alla kommununa.

Hesar høvuðslinjur eru:
- At talið av sporum í høvuðsstaðarskúlunum í hádeild (7.-9. flokk) verður 14
- At Venjingarskúlin og Kommunuskúlin leggja saman í trý-sporaðan Vesturskúla
- At Skúlin á Argjahamri, Hoyvíkar skúli og Skúlin við Løgmannabreyt verða tvey-sporaðir skúlar 1.-9. flokk
- At Eysturskúlin verður tvey-sporaður 1.-6. flokk og fimm-sporaður 7.-9. flokk
- At Sankta Frans skúli verður tvey-sporaður 1.-6. flokk
- At næmingar úr Sankta Frans skúla, Nólsoyar skúla, Velbastaðar skúla, Kaldbaks skúla og Kollafjarðar skúla flyta í 7. flokk í Eysturskúlan
- At Nám X flytur úr Eysturskúlanum

Uppskotið um at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum hongur ikki saman við skúlabygnaðinum, men er mál um skipan av skúlatilboðum.

Landsstýrið skal sambært fólkaskúlalógini § 57, stk. 5 góðkenna skúlabygnað kommununnar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja uppskotið til skúlabygnað fyri alla kommununa samsvarandi høvuðslinjunum omanfyri.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið og til kunningar í fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Kunnað varð um málið

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í skrivi dagf. 19. februar 2013 boðar Mentamálaráðið frá, at Mentamálaráðið góðkennir ikki uppskotið til nýggjan skúlabygnað fyri Tórshavnar kommunu.

Í skrivinum verður víst á, at Mentamálaráðið arbeiðir við broytingum í fólkaskúlabygnaðinum, so at tímar í størri mun verða tillutaði til skúlaøki. Á henda hátt metir Mentamálaráðið, at tað ber til at tillaga fólkaskúlabygnaðin til tey ávísu økini, sum síðan sjálv gera av, í hvørjum hølum undirvíst verður.

Mentamálaráðið hevur ætlanir um at seta eina royndarskipan í verk, har tímatillutanin verður lagað eftir næmingatalinum í hvørjum árgangi. Ætlanin er framhaldandi, at kommunurnar sjálvar skulu gera av, hvørjir skúlabygningar skulu brúkast, men hetta má vera í tráð við fíggjarviðurskifti landsins, og í tráð við hvussu nógvir næmingar eru. Mentamálaráðið vil fegið samstarva við Tórshavnar kommunu viðvíkjandi skúlabygnaðinum í framtíðini og er altíð til reiðar at umrøða spurningin nærri.

Meðan omanfyri nevnda serliga snýr seg um tímajáttanina frá Mentamálaráðnum til skúlarnar, er skúlabygnaðurin eisini tengdur at íløguætlanini hjá kommununi í mun til tørv á skúlabygging og dagføring. Fundir hava verið við skúlastýri serliga í mun til støðuna hjá Venjingarskúlanum, Tórshavnar kommunuskúla og Sankta Frans skúla.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, samtykti at fáa til vega eina verkætlanar- og tørvslýsing fyri ein miðbýarskúla og Vesturskúla og heita á býráðið um fíggjarnevndina at játta kr. 1.000.000 av kontu 4176 verkætlan L41012 Vesturskúli fyrireiking.

Ein minniluti, Jógvan Arge og Tróndur Sigurðsson, taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 26. juni 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 500.000 av konto 4176, verkætlan L41012 Vesturskúli fyrireiking, at fáa til vega eina tørvslýsing fyri ein miðbýarskúla og Vesturskúla. Umsitingin fær til vega tørvslýsingina í samráð við mentamálanevndina, ið verður at leggja fyri býráðið í seinasta lagi 15. september 2013.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 26. juni 2013.

- Ávegis tørvslýsing verður løgd fram.

**Mentamálanevndin 10. september 2013:** Málið umrøtt. Tørvslýsing verður latin nevndini til víðari viðgerð 15. september 2013.

**Ískoyti:**
Tørvslýsing við heitinum *Skúlabygnaður og skúlabygningar – Tørvslýsing miðstaðarøkið* verður løgd fram at viðgera.

**Mentamálanevndin 9. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskoti 4 í tørvslýsingini, og at heita á umsitingina um at útgreina bygnað og bygging í mun til ymsu skipanirnar, kostnað, verkseting og tíðarætlan, at leggja fyri nevndina aftur skjótast.

**Mentamálanevndin 21. oktober 2013:** Útgreiningin varð løgd fram. Málið útsett til næsta fund.

**Mentamálanevndin 6. november 2013:** Útsett.

**Mentamálanevndin 10. desember 2013:** Samtykt at heita á umsitingina um tilmæli til arbeiðssetning, har arbeiðsbólkur verður settur at gera uppskot til samskipan og/ella samanlegging av Venjingarskúlanum og Kommunuskúlanum, herundir leiðsluviður-skifti, undirvísing, bygningar v.m. at leggja aftur fyri nevdina á næsta fundi.

- Uppskot til arbeiðsbólk og arbeiðssetning verður lagt fram.

**Ískoyti:**
Í sambandi við uppskotið at byggja nýggjan skúla í vesturbýnum, varð mælt til, at Venjingarskúlin og Kommunuskúlin verða lagdir saman og flyta í henda nýggja skúlan.

Við støði í, at høvuðsstaðarøkið frameftir væntast at hava 12 spor 1.-7. flokk og 13 spor 8.-9. flokk, verður talan um at lækka samlaða talið av sporum við tveimum í mun til bygnaðin í dag. Sum fortreyt fyri hesum liggur eisini ein betri gagnnýtsla av høliskapasiteti í Skúlanum á Argjahamri.

Nýggi skúlin verður tí væntandi tveysporaður 1.-7. flokk og fýrasporaður 8.-9. flokk, har tey bæði eykasporini í framhaldsdeildini eru flokkar úr Sankta Frans skúla. Harumframt skal forskúli og frítíðarskúli verða partur av bygninginum. Atlit eigur at takast til, at til ber at byggja skúlan út seinni.

Eingin endalig tíðarætlan fyriliggur fyri nýggjum skúla. Eingin endalig avgerð er heldur tikin um talið av sporum, men mett verður neyðugt at fyrireika tilgongdina at samskipa undirvísingarvirksemið hjá báðum skúlunum longu nú, herundir næmingatilgongdina, eins og at fyrireika eina bygnaðarliga samanlegging.

Settur verður tí arbeiðsbólkur at gera uppskot til samskipan og/ella samanlegging av Venjingarskúlanum og Kommunuskúlanum.

**Tilmæli:**
Arbeiðsbólkurin skal:

1. Gera uppskot til bygnaðarliga samskipan og/ella samanlegging av skúlunum báðum sum liður í ætlanini um nýggjan skúla, herundir tíðarætlan og meting um fyrimunir og vansar.

2. Gera uppskot til samskipan av øllum undirvísingarvirkseminum hjá skúlunum báðum í verandi virknu høliskørmum við denti á at savna ymsu floksstigini, og at ætlaði nýggi skúlin verður at hava tvey færri spor enn skúlarnir samlað av hava í dag, herundir tíðarætlan.

Arbeiðsbólkurin skal verða liðugur lata uppskot 2. mai 2014.

Arbeiðsbólkurin verður mannaður soleiðis:

- Eitt umboð fyri skúlaleiðsluna í Venjingarskúlanum

- Eitt umboð fyri skúlaleiðsluna í Kommunuskúlanum
- Eitt umboð fyri lærararnar í Venjingarskúlanum
- Eitt umboð fyri lærararnar í Kommunuskúlanum
- Eitt umboð fyri foreldrini í skúlastýrinum í Venjingarskúlanum
- Eitt umboð fyri foreldrini í skúlastýrinum í Kommunuskúlanum
- Eitt umboð fyri mentamáladeildina, sum samstundis verður skrivari
- Trivnaðarstjórin, sum samstundis er formaður

**Mentamálanevndin 8. januar 2013:** Samtykt at taka undir við arbeiðssetninginum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 30. januar 2014:** Málið beint í mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 6. februar 2014:** Samtykt at seta arbeiðsbólk, sum skal:

Gera uppskot til bygnaðarliga samskipan og/ella samanlegging av skúlunum báðum sum liður í ætlanini um nýggjan skúla, herundir tíðarætlan.

Gera uppskot til samskipan av øllum undirvísingarvirkseminum hjá skúlunum báðum í verandi virknu høliskørmum við denti á at savna ymsu floksstigini, og at ætlaði nýggi skúlin verður at hava tvey færri spor enn skúlarnir samlað av hava í dag, herundir tíðarætlan.

Arbeiðsbólkurin skal lata uppskot í seinasta lagi 15. mai 2014.
Arbeiðsbólkurin verður mannaður soleiðis:
Eitt umboð fyri skúlaleiðsluna í Venjingarskúlanum
Eitt umboð fyri skúlaleiðsluna í Kommunuskúlanum
Eitt umboð fyri lærararnar í Venjingarskúlanum
Eitt umboð fyri lærararnar í Kommunuskúlanum
Eitt umboð fyri foreldrini í skúlastýrinum í Venjingarskúlanum
Eitt umboð fyri foreldrini í skúlastýrinum í Kommunuskúlanum
Eitt umboð fyri mentamáladeildina, sum samstundis verður skrivari
Trivnaðarstjórin, sum samstundis er formaður 2

Harumframt samtykti nevndin, at bygginevndin fyri nýggjum Vesturskúla beinanvegin fer undir neyðugu fyrireikingarnar at byggja tvey sporaðan skúla, sum skal kunna víðkast til trísporaðan skúla.

Nevndin samtykti eisini, at Kommunuskúlin verður mentanar- og virksemishús, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini viðvíkjandi arbeiðsbólkinum og arbeiðinum hjá bygginevndini fyri Vesturskúlan og at beina málið í byráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Samtykt við 12 atvøðum fyri og ongari ímóti at taka undir við fíggjarnevndini um vesturskúlan og at arbeitt verður víðari við tilmælinum hjá mentamálanevdnini um at kommunuskúlin verður mentunar- og virksemishús.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu: Elin Lindenskov .

**Ískoyti:**
Skúlaumboðini í arbeiðsbólkinum, sum viðgerð samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Kommunuskúlanum, vísa á, at tað er órealistiskt og skúlapolitiskt ein vánalig loysn at leggja skúlarnar saman at minka heilt niður í tvey spor, tí notat dagfest 31. mars 2014. Skúlaumboðini mæla tí staðiliga til nýggja viðgerð soleiðis, at nýggi Vesturskúlin verður trý-sporaður.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Nevndin samtykti at broyta arbeiðssetningin soleiðis, at Vesturskúlin er trý spor í lægru floksstigunum og fimm í framhaldsdeildini, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Arbeiðsbólkurin við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina hevur gjørt uppskot til bygnaðarliga samskipan og/ella samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla, og uppskot til samskipan av øllum undirvísingarvirkseminum hjá báðum skúlum, herundir tíðarætlan. Uppskotið hevur verið í skúlastýrunum í báðum skúlunum til hoyringar.

Í mun til fyrru uppgávuna, bygnaðarliga samskipan og/ella samanlegging, er arbeiðsbólkurin ikki samdur. Gjørd eru tvey tilmæli hesum viðvíkjandi – A og B.

<u>Tilmæli A</u>
Umboðini fyri Kommunuskúlan mæla til at:

- skúlarnir verða lagdir bygnaðarliga saman í ein skúla 1. januar 2015 undir einari leiðslu og einari rakstrarjáttan
- foreldraumboðini í skúlastýrunum verða sitandi til nýval hevur verið.

<u>Tilmæli B</u>
Umboðini fyri Venjingarskúlan mæla til at:

- skúlaárið 2014/2015 verða ongar bygnaðarligar broytingar
- skúlaárið 2015/2016 verður fyrsti flokkur skrivaður inn í ein samanlagdan fyrsta árgang
- august 2015 verða skúlarnir samanlagdir í eina eind
- foreldraumboðini í skúlastýrunum verða sitandi til nýval hevur verið.

Í mun til seinnu uppgávuna, samskipan av umsitingarvirkseminum, hevur arbeiðsbólkurin gjørt tvey uppskot til, hvussu undirvísingarvirksemið kann skipast í verandi virknu høliskørmum hjá skúlunum. Bólkurin mælir til, at undirvísingarvirksemið verður skipað soleiðis:

- skúlaárið 2014/2015 verða ongar broytingar í virkseminum, men skúlarnar fara at samstarva um vallærugreinir og skipa fyri nøkrum felags tiltøkum fyri ymsu deildirnar og/ella fyri ymsu flokkarnar
- januar 2015 verður 1. flokkur skrivaður inn í ein samanlagdan fyrsta árgang í Kommunuskúlan/ Venjingarskúlan
- skúlaárið 2015/2016 byrjar gongdin so at flyta árgangirnar saman í sama bygning.

Sambært hesum uppskotinum verður frá í januar 2015 felags innskriving í skúlarnar báðar, soleiðis at næmingarnir verða skrivaðir inn í ein samanlagdan fyrsta árgang í Kommunuskúlan/Venjingarskúlan upp til 3 spor.

Haraftrat flyta onkrir av árgangunum skúlaárið 2015/2016 í báðum skúlunum á sama stað – í sama bygning, soleiðis at floksstig verða savnað. Henda gongdin heldur so fram, til nýggi skúlin er liðugur. Tá eru so fyrstu árgangirnir í skúlunum báðum samanlagdir, og teir eldru eru í sama bygningi, so teir kenna hvønn annan væl og eru vanir at samstarva.

Eftir hesum uppskotinum eru skúlaárið 2018/2019 fýra teir yngstu árgangirnir skrivaðir inn í samanlagda skúlan í mesta lagi 3 spor. Hinir árgangirnir eru frammanundan eisini trý spor, tó eru 6. árgangur fýra spor og 9. árgangur seks spor. Næmingatalið samanlagt í hesum flokkunum er ikki hægri enn so, at tað ber væl til at leggja 6. árgang saman í tríggjar flokkar, og 9. árgang saman í fimm flokkar.

<u>Hoyring skúlastýrini</u>
Skúlastýrið í Tórshavnar kommunuskúla tekur undir við tilmæli A og ger í viðmerkingunum til hoyringsskrivið vart við, at tað metir tilmæli A sera avgerandi og fyritreyt fyri, at góða tilgongdin og jaligu intentiónirnar í samanleggingini áhaldandi halda fram til eitt nýtt og ørvísi skúlatilboð til borgarar í høvuðsstaðnum.

Skúlastýrið í Venjingarskúlanum tekur undir við tilmæli B og ger í viðmerkingunum til hoyringsskrivið vart við, at tað metir tilmæli B vera bestu loysnina, treytað av at tilgongdin verður skipað soleiðis, at samstarvið verður á jøvnum føti, og at felags leiðsla verður sett samstundis sum formliga samanleggingin fer fram, tvs. 1. august 2015. Fyri skúlaárið 2014/2015 eigur at verða álagt verandi skúlaleiðarum at samstarva um felagsinnskriving, vallærugreinir v.m., og at lýst eigur at verða eftir felags skúlaleiðara at seta pr. 1. august 2015.

<u>Broytingar</u>
Landsstýrið skal sambært fólkaskúlalógini § 57, stk. 5 góðkenna skúlabygnað kommununnar. Í sambandi við uppskotið um nýggjan skúla í vesturbýnum er samtykt at leggja Venjingarskúlan og Tórshavnar Kommunuskúla saman í ein nýggjan skúla.

Í hesum sambandi verður mælt til, at Tórshavnar kommuna sendir Mentamálaráðnum umsókn um at broyta bygnaðin fyri hesar báðar skúlarnar soleiðis, at til skúlaárið 2015/2016 verða í mesta lagi tríggir flokkar skrivaðir inn í Venjingarskúlan/Tórshavnar Kommunuskúla. Mentamálaráðið verður somuleiðis kunnað um, at nýggi skúlin verður bygdur til trý spor 1.-7. flokk og fimm spor í 8.-9. flokki.

Leiðsluviðurskiftini er myndugleikaøkið hjá Mentamálaráðnum. Í hesum føri verður talan um at broyta leiðslubygnaðin við samanlegging. Staðfestast má, at skúlarnir eru ikki samdir um tilmæli til, hvussu hetta skal gerast, og hvør tíðarætlanin skal vera fyri felags leiðslu.

Við støði í, at talan verður um felags innskriving í januar 2015, at floksstig skulu savnast frá sumri 2015, og at øll undirvísingarætlanin fyri skúlaárið 2015/2016 skal fyrireikast, herundir læraraviðurskifti, má metast vera tørvur á einhvørjari skipan við felags leiðslu frá 1. januar 2015, hvørt tað er ein leiðari, so sum tilmæli A er, ella sum skúlastýrið í Venjingarskúlanum við støði í tilmæli B mælir til – eitt álagt samstarv millum verandi leiðarar. Samstundis skal tryggjast, at várhálvan skúlaárið 2014/2015 ikki verður nervað av samanleggingartilgongdini.

Mentamálaráðið hevur í samskifti við umsitingina víst á, at ráðið fer at gera sítt til at finna loysnir á leiðsluspurninginum, sum styðja undir alla samanleggingartilgongdina, og at kommunan og Mentamálaráðið samskifta nærri um hesi viðurskifti, áðrenn endaligar avgerðir verða tiknar.

Samanlegging merkir eisini, at rakstrarjáttanin frá kommununi verður skipað í einari rakstrarkontu.

## Tilmæli:

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- at leggja Kommunuskúlan og Venjingarskúlan bygnaðarliga saman frá 1. januar 2015, og í hesum sambandi heita á Mentamálaráðið um samstarv um viðurskifti í sambandi við samanleggingartilgongdina, har Mentamálaráðið hevur avgerðarmyndugleikan, bæði í mun til leiðsluviðurskiftini, tímajáttan, starvsfólk v.m.
- at foreldraumboðini í skúlastýrunum verða sitandi til nývalhevur verið
- at skúlaárið 2014/2015 verða ongar broytingar í virkseminum, men at skúlarnar fara at samstarva um vallærugreinir og skipa fyri nøkrum felags tiltøkum fyri ymsu deildirnar og/ella fyri ymsu flokkarnar
- at rakstrarkonturnar í kommunalu fíggjarætlanini fyri hesar skúlar verða lagdar saman í eina kontu samstundis sum bygnaðarliga samanleggingin
- at í januar 2015 verður 1. flokkur til skúlaárið 2015/2016 skrivaður inn í ein samanlagdan fyrsta árgang í Kommunuskúlan/Venjingarskúlan upp til trý spor
- at skúlaárið 2015/2016 byrjar gongdin at flyta árgangirnar saman í sama bygning

at heita á Mentamálaráðið um at góðkenna skúlabygnaðin fyri samanlagda skúlan samsvarandi krøvunum í fólkaskúlalógini grein 57, stk. 5.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:**
Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Sigrún Mohr tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jógvan Arge og Bogi Andreasen tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Sjúrður Olsen samtykkja at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge taka støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Fyrst varð atkvøtt varð um tilmæli frá Boga Andreassen, um at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at tíðarskeiðið í 1. punkti verður broytt til 1. august 2015, ið fall við einari atkvøðu fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddi: Bogi Andreasen.

Ímóti atkvøddu: Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr og Tróndur Sigurdsson.

Greiddu ikki atkvøðu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Halla Samuelsen, Sjúrður Olsen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr og Tróndur Sigurdsson.

Greiddu ikki atkvøðu: Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Jógvan Arge,

# 154/14 Útbygging av Hoyvíkshøllini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 6/14 | 14/00601-10 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 66/14 | 14/00601-10 |
| 3 Mentamálanevndin | 07.05.2014 | 79/14 | 14/00601-10 |
| 4 Fíggjarnevnd | 24.06.2014 | 199/14 | 14/00601-10 |
| 5 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 154/14 | 14/00601-10 |
| 6 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 154/14 | 14/00601-10 |

**Málslýsing:**

Hoyvíkshøllin varð tikin í nýtslu í 2002. Neyðugt er við dagføring av høllini m.a. tí hølisviðurskiftini ikki eru nøktandi. Talan er m.a. um umklæðingarrúm, wc og gongd, sum eru ov smá. Eisini er tørvur á einum duri, soleiðis at fólk ikki koma beint inn í høllina uttanífrá. Í sambandi við nevndu dagføring skal gerast ein lýsing av tørvinum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 100.000 kr. av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi, til at lýsa tørvin á at dagføra Hoyvíkshøllina og gera kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 til at lýsa tørvin á at dagføra høllina og gera kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Atkvøtt var um tilmæli hjá fíggjarnevndini, sum var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 0 ímóti. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin K. Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup S. Simonsen, Sjúrður Johannesen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl. Ingrid Henriksen og Jan Christiansen greiddu ikki atkvøðu.

**Uppískoyti:**
Skotið verður upp at byggingin verður skipað á tann hátt, at 260 $m^2$ verða bygdir í tveimum hæddum, tilsamans 520$m^2$, har bert veghæddin verður innrættað endaligt. Á veghædd verður høvuðsinngongd og forhøll, 4 áskoðaravesir, goymslur og tvey umklæðingarrúm við brúsum. Hetta loysir í fyrstu atløgu bráðfangis tørvin.

Í kostnaðarmetingini er roknað við, at restin av bygninginum ikki er innrættaður, hvørki við innveggjum, hurðum, el- og ljósbúnaði, hita-og sanitetsbúnaði endaligum lofti, gólvbúnaði, málaraarbeiði og trappu. Tað er fyrireikað fyri lyft, men lyftin er ikki við í kostnaðinum.

Kostnaðurin er 4.488.000 kr íroknað ókent, ráðgeving og mvg.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,5 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (journal-nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndina.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

- Tilmæli kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 24. mars 2010:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Trivnaðarstjórin greiddi frá málinum.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 3. november 2010:** Samtykt at heita á umsitingina um at fáa málið frá hondini.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
MAP Arkitektar hava gjørt skitsur av innrætting í mars 2010, og upprit v. kostnaðarmeting 17. februar 2010, áljóðandi kr. 4.587.245. Kostnaðarmeting har prosjektumsiting, ókent, prístalsregulering v.m. er lagt afturat meting ráðgevans, er av umsitingini mett til kr. 5.100.000. Tøkur peningur á játtanini er pr. 9. februar 2011 kr. 4.541.409. Írestandi kapitaltørvurin er á fyriliggjandi grundarlagi sostatt mettur til kr. 558.591.

Verkætlanin fevnir bert um liðugtgerð innan av pørtum av útbyggingini, sambært uppritinum hjá ráðgevanum.

Býráðið hevur 26. november 2009 samtykt at játta kr. 4,5 mió til verkætlanina, og 20. mai 2010 er samtykt at lata arbeiðið bjóða út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at:

- at góðkenna skitsuuppskotið hjá ráðgevanum
- at góðkenna uppskotið til sáttmála við ráðgevan
- at útvega metta írestandi kapitaltørvin á kr. 558.591 av íløgukontu 5775 L00001, løgujáttan,

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 9. februar 2011:** Jákup Eghom Hansen, tekniskur stjóri, greiddi frá. Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og mæla býráðnum til at játta kr. 559.000 av framfluttum íløgukarmi fyri 2010.

**Býráðið 24. februar 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 30. august 2011:** Málið umrøtt.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Tann 27. juni 2011 var lisitatión uppá útbygging av Hoyvíkshøllini. 4 tilboð komu inn. Úrslitið frá lisitatiónini tann var:

1. J & K Petersen kr. 4.733.029,33 u/ mvg
2. ÁTS kr. 5.182.139,75 u/ mvg
3. Búsetur kr. 6.010.299,24 u/ mvg
4. Articon kr. 6.291.903,00 u/ mvg

Metingin í byggiskránni nov. 2009 er kr. 4.224.000,- u/ mvg.

Lisitatiónsúrslitið kann tulkast sum ein staðfesting av, at áður gjørda kostnaðarmetingin, sum hevur ligið til grund fyri politisku viðgerðini, hevur verið so tíðliga í verkætlanini og á einum so mikið leysum grundarlag, at neyvleikin á henni er at rokna sum vegleiðandi.

Ráðgevin hevur kannað, um møguligt er at spara í tilboðsupphæddini og metir, at tað ikki er ráðiligt, tí hetta kemur at ganga út yvir umklæðingarrúmini, sum ikki verða tøk, um sparing verður gjørd. Tær sparingar, sum kundu komið uppá tal, eru longu gjørdar í byggiskránni og í projekteringini.

Kannað er eisini, hvar munurin millum byggiskrá og tilboð stavar frá. Í byggiskránni er ikki roknað við, at bygningurin kemur so langt niður á parkeringsøkið, sum tær neyvu uppmátingarnar í projektinum hava staðfest.

Tað er serliga hetta, sum ger seg galdandi, har “grundin” verður hægri, sum er frávikið millum tilboð og byggiskrá.

Umsitingin hevur tí eisini kannað møguleikan fyri at gagnnýta hæddarmunin á økinum til kjallara, so at hølir, sum stórur tørvur er á í hesi høllini, kunna gerast undir útbyggingini, ístaðin fyri at fylla upp.

Tilboð uppá hetta arbeiðið er heintað inn frá lægstbjóðandi uppá upprunaútbjóðingina.

Við støði í frágreiðing frá MAP Arkitektar, sum er ráðgevi á verkætlanini um útbygging av Hoyvíkshøllini, hevur tekniska fyrisitingin gjørt kostnaðarmeting av, hvat verkætlanin, íroknað allar útreiðslur, kann væntast at koma at kosta. Íroknað hesa kostnaðarmeting er eisini umlegging av fjarhitarørum sum koma at liggja undir byggingini, og sum Fjarhitafelagið krevur flutt.

Fíggjarlig viðurskifti:
Býráðið hevur áður játtað kr. 5.100.000,- tilsamans til verkætlanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at taka av tilboðnum hjá J & K Petersen um upprunaliga tilboðið á kr. 4.733.029,33 u/ mvg og av ískoytistilboðnum á kr. 263.040,- at byggja fulla óinnrættaða veghædd undir umklæðingarrúmunum, og gera sáttmála við J & K Petersen um tilsamans kr. 4.996.069,33.

**Mentamálanevndin 8. september 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at taka av tilboðnum uppá kr. 4.996.069,33 frá J & K Petersen.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggimálið er komið fram, at neyðugt er at grava munandi longri niður fyri at koma niður á fast. Staðfest er, at neyðugt verður at grava eitt lag av mógvi burtur undan tilbygninginum, umleið 2,5 m., og fylla grótfyllu í aftur. Sambært upplýsingum frá Mikael Viderø, býararkitekti, verður kostnaðurin av hesum arbeiði umleið kr. 375.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta írestandi peningin kr. 375.000,00 av íløgum 2012, konto 5775 vøllurin í Hoyvík.

**Mentamálanevndin 11. januar 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 375.000,00 av íløgum 2012, konto 5775 vøllurin í Hoyvík.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Í íløguætlanini fyri 2014 eru kr. 2 mió settar av til framhald at gera útbygningin lidnan innan. Harumframt eru umleið kr. 300.000 tøkar á verkætlanarkontuni 5775 L57006 útbygging av Hoyvíkshøllini.

Enn standa partar av miðhæddini, øll veghæddin og øll loftshæddin óinnrættað. Mett verður, at fyri hesa játtan ber til at gera eitt umklæðingarrúm aftrat og almenn wc í miðhæddini eins og møguliga partar av veghæddini (kjallarin), har ætlan er at gera vektrúm (venjingarhøli) og fundar-/felagshøli.

Í hesum sambandi skal útbjóðingartilfar fáast til vega fyri liðugtgerð av miðhæddini og veghæddini. Arbeiðið verður at bjóða út í innbodnari lisitiatión.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2 mió av íløguætlanini fyri 2014 til liðugtgerð av mið- og veghæddini, herundir at útvega útbjóðingartilfar og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Mentamálanevndin 8. januar 2014:** Samtykt at biðja umsitingina um at lýsa ætlanina fyri at gera forbygningin endaliga lidnan til næsta nevndarfund.

**Ískoyti:**
Eftir áheitan er gjørd ein fyribils kostnaðarmeting fyri liðugtgerð av bygninginum sum er bygdur, tvs. allar hæddir. Umbidnu kostnaðirnir eru hesir:

- liðugtgerð av bygninginum sum er bygdur, tvs. allar hæddir,
    - kostnaðurin av miðhæddini við at gera eitt umklæðingarrúm afturat
    - kostnaðurin av miðhæddini við at gera eitt goymslurúm í staðin fyri umklæðingarrúm

Kostnaðarmetingar verða lagdar fram á fundinum.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Samtykt at fara á ástaðarfund á næsta nevndarfundi.

**Mentamálanevndin 7. mai 2014:** Nevndin hevur verið á ástaðarfundi.

Samtykt at biðja umsitingina um tilmæli við atliti at heildarætlanini og funktionalitet, tørvinum hjá felagnum og tøku játtanini.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Málið umrøtt og útsett.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Útsett.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Tikið av skrá.

## 155/14 Frílendið við Hoydalsá (2012-0881)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 205/14 | 14/00813-13 |
| 2 Tekniska nevnd | 23.06.2014 | 209/14 | 14/00813-13 |
| 3 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 155/14 | 14/00813-13 |
| 4 Fíggjarnevnd | 24.06.2014 | 200/14 | 14/00813-13 |

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Tórshavnar býráð samtykti í 1972 at leggja økið til frílendi, at nýta til almenning, náttúrufriðing og mentunarlig endamál.
Í 1983 staðfesti Yvirfriðingarnevndin friðingarlinjur fram við ánni
Í 1995 var serstøk samtykt lýst á økið, um fríøkir, traðarbrúk og gróðursetingar.
Økisvídd: 300.000 m²
Longd: 4 km
Gøtur: 7 km
Eigaraviðurskifti: Tórshavnar kommuna, Føroya Jarðargrunnur, Føroya Landsstýri og privat ogn.
Jarðfrøði: Ovastu basaltfláir við sermerktum landslag skapt av jøkulsísi. Dalarnir eru 3 tilgróðnar gamlar tjarnir, sum í dag eita niðastu- mið- og ovastu Hoydalar (mús um Boðanesgjógv)

Hoydalsá var mark millum Hoyvík og Tórshavn, og ein av teimum stórstu áunum í Føroyum. Tað hendir seg at áin fer uppum áarbakkarnar og sæst hetta best í ovastu Hoydølum tá tað regnar illa í toybili um veturin, tá kann allur slættin liggja undir í vatni.

Áin rennur úrVillingardali, um tveir fossar, Villingadalsfoss og Svartafoss, ígjøgnum Ternurygg og Hoydalar og á sjógv í Boðanesgjógv.

Miðað verður ímóti at áin er so rein at sjósíl eru í ánni og at tálma útláti av dálkandi evnum í ánna. Fyrr komu sjósíl niðan til Svartafoss.

Fyrr varð sandur tikin úr ánni og koyrdur til Havnar við hestavogni til ymisk byggiarbeiðir.

Boðanesgjógv
Niðri við gjónna var í 1930'unum lýsismeltarí og síggjast leivdir av hesum enn, umframt at Tórshavnar Mekaniski Grótídnaður hevði grótbrot stutt omanfyri inntil mitt í 1980'unum.

Sanatoriið
Á fløtuni í niðasta Hoydali var um aldarskifti 1900 fyrsti fótbóltvøllur í Havn og um sama mundi varð tuberklastøðin, Sanatoriið í Hoydølum bygt. Tað lat aftur í 1965. Miðskeiðis í 1960'unum varð Studentaskúlin bygdur og er hann har enn.

Viðarlund varð byrjað eftir áheitan frá yvirlæknanum á sanatoriinum í 1913 og skipaði Det Danske Hedeselskab fyri gróðurseting av trøunum. ì 60'unum fekk plantagunevndin hjá løgtinginum ábyrgd av viðarlundini. Hetta var byrjan til gróðurseting av Hoydølum.

Skraddaratrøðin
Á Skraddaratrøðni er gamal urtagarður sum skraddarin Johannes Nolsøe lat gera í 1920-30. Hevði vogn við stórum hjólum sum hann dróg til Havnar at selja egg , róma, epli, gularøtur og

avskorðin blómstur, heimaftur við hevði hann leivdir frá bakaríum at geva dýrunum. Eisini var ein stórur hylur sum varð brúktur at svimja í.

Gróðurstøðin
Í 1960 árunum var minkaaling har sum Skógrøkt Landsins nú hevur gróðurstøð til royndir við ymiskum træ og runnasløgum, ið hóska til føroyskt veðurlag.

Áin varð umløgd í sambandi við minkagarðin og kloakkskipan í niðastu Hoydølum.

Svartifossur
Eitt lýsandi Y í landslagnum, fleiri ferðir umrøddur av yrkjarum og nú ynda útferðarmál, eisini sum bakgrund til brúðarmyndir

Ternuryggur
Verandi urtagarðsskipan er frá 1930 árunum. Tann 23. juni í 1938 varð urtagarðsfelagið "Ternuryggur" stovnað við 130 stykkjum, harav nú 50 eru farin undir sethús.

**Ískoyti**
Í sambandi við fíggjarætlanarviðgerðina fyri 2011, vóru ymsar lidnar verkætlanir lokaðar av býráðnum 27. jan. 2011 (sí j. nr. 2010-2717), og avlopspeningur varð avsettur til aðrar verkætlanir í staðin – herundir ein ætlan um frílendi til borgaran á økinum við Hoydalsá. Umsitingin hevur síðani arbeitt við at eina skipanarætlan fyri lendini fram við ánni, soleiðis at tey vórðu borgarunum í býnum til bestu náttúru- og frítíðarupplivingar, við íðkanarmøguleikum og rørslufremjandi tilboðum. À tann hátt til gagns fyri bæði heilsu og trivnaðin hjá borgarunum.

Býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot í samráð við býararkitektin og lendisdeildina um at skipa økið

Tørvur er á at gera ítøkiligar staðsetingar, og at nágreina hvat innihaldið skal verða, fyri síðan at at meta um kostnaðin og hvussu verkætlanin kann fremjast stigvíst.

**Tilmæli.**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við yvirskipaða leistinum fyri uppskotið til heildarætlanin "Frílendi við Hoydalsá", og arbeitt verður víðari við verkætlan at leggja fyri nevnd við kostnaðarmeting. Verkætlanin verður fíggjað av konto 6275-L62015.

Mikael Jacobæus var við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Formaðurin ynskir málið á skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Málið tikið av skrá.

**Ískoyti**
Arbeitt verður við málinum. Uppskot eru gjørt til fyribils kostnaðarmeting og fyribils ætlan fyri økið. Kostnaðarmetingin er mett til uml kr. 1,5 mió. Skjal 2012-0881/8

**Tilmæli.**
Tekniski stjórin mælir til at raðfesta játtan til verkætlanina á langtíðar íløgu ætlanini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum

## Tilmæli:

Tekniski stjórin og býarskipanardeildin mæla til at játta avsetta peningin á íløguætlanini fyri 2014 til frílendisætlanina – kr. 1,0 mió. kr. á kontu 6275 – til at fara undir fremjan og fyrireiking av frílendisætlanini, so langt sum játtanin røkkur.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Útsett.

**Tekniska nevnd 23. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

## 156/14 Kunning um gerð av heildarætlanini til kommunuplan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 118/14 | 14/02088-15 |
| 2 Tekniska nevnd | 26.05.2014 | 142/14 | 14/02088-15 |
| 3 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 180/14 | 14/02088-15 |
| 4 Tekniska nevnd | 23.06.2014 | 207/14 | 14/02088-15 |
| 5 Vinnunevndin | 23.06.2014 | 29/14 | 14/02088-15 |
| 6 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 155/14 | 14/02088-15 |
| 7 Trivnaðarnevndin | 23.06.2014 | 35/14 | 14/02088-15 |
| 8 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 156/14 | 14/02088-15 |
| 9 Fíggjarnevnd | 24.06.2014 | 205/14 | 14/02088-15 |

**Kommunuplanur**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Býráðið 27. januar 2011: Vald vóru Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal, Bogi Andreasen, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Niðursetti stýrisbólkurin fyri arbeiðinum, hevur arbeitt fram uppskot til "planstrategi" ið er fyrsta stigið av arbeiðinum. Teksturin til hetta verður týddur til føroyskt, og tá er tað greitt at leggja fram alment til hoyringar aftaná býráðssamtyktina.

**Tilmæli:**
Stýrisbólkurin mælir byggi-& býarskipanarnevndini til at taka undir við uppskotinum til planstrategi, og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. mars 2011:** Samtykt at taka málið av skrá og viðgera tað á einum serstøkum fundi.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Samtykt at taka málið av skrá og viðgera tað á einum serstøkum fundi saman við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Málið umrøtt. Stjórnin ger uppskot til skipan av arbeiðinum og nevndarsamansetingini, ið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Arbeiðið við kommunuplaninum var ikki heilt liðugt í 2012 og varð eisini lagt stilt áðrenn seinasta býráðsval. Í sambandi við skipan av nýggjum býráði eftir kommunuvalið var politisk avgerð tikin um, at kommunuplanur skuldi liggja undir fíggjarnevndini.

Klárt er nú at taka arbeiðið við kommunuplaninum upp aftur, og ráðgevin er biðin um eitt upplegg til tíðarætlan og eina kostnaðarmeting.

Sambært tíðarætlanini kann byrjast í desember 2013, og kann uppskotið til kommunuplan tá vera klárt til framløgu í býráðnum síðst í juni 2014. Almenn hoyring kann síðani vera frá medio juli til medio september 2014, og síðani endalig góðkenning í býráðnum síðst í september 2014.

Kostnaðurin at gera kommunuplanin lidnan er av ráðgevanum mettur til kr. 470.000 til 500.000 u. mvg. Harumframt koma innanhýsis útreiðslur.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til:

1. at játta kr. 600.000 av íløgukarminum fyri 2014 til miðbýarætlan, kto. 6275
2. at góðkenna uppskotið til tíðar-/arbeiðsætlan
3. at fíggjarnevndin tekur avgerð um umboð í politiskum fylgibólki
4. at stjórnin mannar stýrisbólkin
5. at býarskipanardeildin, undir leiðslu av býararkitekti, verður verkætlanarbólkur
6. at politiski fylgibólkurin og stýrisbólkurin innan endan av januar 2014 hava tikið avgerð um 3-4 høvuðsmál fyri planstrategiina fyri komandi 5 árini, fram til 2018.

**Fíggjarnevndin 11. desember 2013:** Umboð fyri Rambøll kunnaði um málið. Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at miðað verður eftir, at kommunuplanurin er liðugur at senda út í almenna hoyring medio mai 2014.

Samtykt at fíggjarnevndin er politiskur fylgibólkur.

**Býráðið 12. desember 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at eingin politiskur fylgibólkur verður valdur, men at alt býráðið fylgir málinum eftir skipaðari mannagongd.

**Ískoyti:**
Arbeiðið við kommunuplaninum hevur verið í gongd seinastu mánaðirnar. Umsitingin kunnar um málið.

Tekniska nevnd 30. april 2014: Útsett.

**Tekniska nevnd 26. mai 2014:** Nevndin ynskir at viðgera endaliga uppskotið áðrenn málið skal fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Lidna kommunuætlanin verður framløgd.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til at beina málið í faknevndirnar til ummælis, áðrenn málið fer fyri býráðið og til almenna hoyring.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 23. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum**.**

**Trivnaðarnevndin 23. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 23. juni 2014:** Málið umrøtt.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Málið umrøtt.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

# 157/14 Kontrast Arkitektar : Umsókn um byggiloyvi til nýtt bakarí í Hoyvík - Mylnan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 23.06.2014 | 215/14 | 14/02169-4 |
| 2 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 157/14 | 14/02169-4 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Málið byrjar við, at Kontrast Arkitektar vegna SMS biðja um ein fund við kommununa, og er hesin fundurin tann 11. mars 2014.
Talan er um eina ætlan at byggja eina nýggja Mylnu við bakarí og eini minni sølubúð á stykki nr. 42, sum er yvir av innkoyringini til skúlan við Løgmannabreyt.
Økið er ikki matrikkulerað. Kommunan fær eitt skitsuprosjekt, sum við fyrivarni sær út til kann góðtakast.
Løgdeildin leggur málið fyri á fíggjarnevndarfundi tann 19. mars 2014, har nevndin samtykti, at gjørdur verður ein leigusáttmáli við keypsrætti og keypsskyldu uppá byggifelt nr. 42 á Karlamagnussarbreyt. Og tá ið økið er matrikulerað, verður endaligt skeyti skrivað, og verður goldin leiga mótroknað í endaliga keypsprísin.

Tann 16. juni 2014 er aftur fundur við Kontrast har kommunan fær eina umsókn um byggiloyvi saman við tekningum til myndugleikaprosjekt.
Økið er framvegis ikki matrikkulerað, tí byggisamtyktin skal broytast, nú býráðið hevur samtykt at leggja fótbóltsvøll har. TK hevur biðið US sundurbýta stykki 42 og 44, men US heldur tað verður trupult, tí felagsøkið eisini verður broytt, tá nakað av felagsøkinum skal leggjast til fótbóltsvøll og skúlan.
US sigur, at um stykki 42 og 44 skulu býtast frá nú, krevur hetta, at tekniska nevnd viðger málið um felagsøkið sum frávik.
Uppskot til ein leigusáttmála er nú gjørt og avrit er viðlagt.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið er fevnt av serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnusarbreyt.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Økið er ikki matrikulerað**.** Talan er um eitt øki burtur av matr. nr. 138a, Hoyvík. Byggifeltið er til víddar uml. 964 m² og er útroknaða metta víddin íroknað part av felagsøkinum í alt 1.658 m².

Í serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnussarbreyt er ásett, at økið er ætlað til:

> *Blandaða miðstaða- og bústaðaendamál.*
> *Stk. 2. Ætlanin við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa bygging, parkering v.m. fram við Karlamagnusarbreyt, ið er ætlað at verða ein framtíðar miðstaðargøta í Hoyvíkshaganum.*
> *Stk. 3. Alt økið liggur í A3 øki í 3. grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, ið er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virki, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt, ið samsvarar við umhvørvisflokk 1 og 2 fyri vinnustykki í Tórshavnar kommunu.*

*Stk. 4. Partur av veghædd skal verða til útatvenda nýtslu (handil, matstovu o.t.), ið almenningurin hevur atgongd til.*

Av tí at bygningurin er ein vinnubygningur í einari hædd, er málið sent býarskipanardeildini til viðmerkingar, sí viðmerkingarnar niðanfyri.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
Tað er trupult at innrætta parkeringsøkini, tí støddin passar illa. Niðanfyri er økið undir 9 m breitt og har skulu lastbilar koyra inn við vøru. M.a. mugu lastbilarnir bakka inn, og tí er avmarkað hvussu nógv parkering kann verða har.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum:**
Um stykki 42 og 44 skulu býtast frá nú krevur hetta, at tekniska nevnd viðger málið um felagsøkið sum frávik.

**Umhvørvisárin:**
Flokkað í umhvørvisflokk 2 og er hetta í tráð við serstøku byggisamtyktina §3, har tað stendur, at økið skal nýtast til virki og stovnar, ið eru flokkað í umhvørvisflokk 1 og 2, har tað verður mett ráðiligt av býráðnum. Harafturat kann økið nýtast til búðstaðir.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Óvist

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**
Karlamagnusarbreyt er, sambært serstøku byggisamtyktini fyri økið, løgd út sum blandað miðstaða- og bústaðabygging. Av tí at bygningurin er ein framleiðslubygningur í einari hædd metir býarskipanardeildin ikki at Karlamagnusarbreyt er rætta staðseting av bygninginum.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Hevur ikki verið hjá øðrum myndugleikum.

**Skjøl:**
Umsókn og tekningar
Serstaka byggisamtyktin fyri Karlamagnusarbreyt
Okkara uppmátingarkort av økinum
Uppskot til leigusáttmála.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at nevndin tekur støðu til um loyvi skal gevast til byggingina og nýtsluna.

**Tekniska nevnd 23. juni 2014:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr og Marin Katrina Frýdal, samtykti ikki at ganga umsóknini á møti, vísandi til at Karlamagnusarbreyt er ikki rætta staðseting til ein framleiðslubygning og harumframt er bygningurin staðsettur uppat skúlanum við Løgmannabreyt.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, mælir til at ganga umsóknini á møti.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Býráðslimur biður um málið á skrá.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti at geva loyvi til at byggja nýggja Mylnu við bakarí og sølubúð á stykki nr. 42 við Karlamagnusarbreyt. Eisini samtykt samstundis at endurskoða serstøku byggisamtyktina fyri Karlamagnusarbreyt fyri at loyva aðrari bygging.

Fyri atkvøddu. Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

# 158/14 Søkt verður Umhvørvisstovuna um at sundurbýta tvey vinnuøki á ovara partinum á Karlamagnusarbreyt stykkini nummar 42 og 44.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 23.06.2014 | 217/14 | 14/03364-1 |
| 2 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 158/14 | 14/03364-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Søkt verður Umhvørvisstovuna um at sundurbýta tvey vinnustykkir á ovara partinum á Karlamagusarbreyt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Málið hastar, tí SMS skal byggja eitt bakarí á grundøki nummar 42.
SMS upplýsir, at teir skulu út úr hølinum á Berjabrekku, har bakaríið er í dag, fyri at flyta inn í nýggja bygningin á Karlamagnusarbreyt og at tað skal verða áðrenn jól í ár.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
Útstykkingin á staðnum er liðug, men økið er ikki matrikulerað enn, tí nakrar broytingar eru gjørdar, herundir er ein fótbóltsvøllur lagdur sunnan fyri Skúlan við Løgmannabreyt, sum ger at nøkur av stykkjunum skulu regulerast.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum:**
Umhvørvisstovan hevur upplýst, at skulu hesi bæði stykkini frámatrikulerast nú, so er talan um frávik, tí tað ikki ber til at staðfesta, hvussu stórt felagsøki hoyrir til hesi stykkini.

**Umhvørvisárin:**
Onki í sambandi við matrikuleringina.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Kommunan kemur at gjalda fyri tær reguleringar, sum verða gjørdar í.s.v. fótbóltsvøllin.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**
Sí viðmerkingar í journal nr. 14/02169.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Hevur ikki verið hjá øðrum myndugleikum.

**Skjøl:**
Tekningar liggja í málinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til geva frávik og at viðmæla sundurbýti. Vísandi til at tað fer at taka longri tíð at fáa øll viðurskifti upp á pláss viðvíkjandi fótbóltsvøllinum og at bygging á staðnum ikki kann bíða eftir hesum.

**Tekniska nevnd 23. juni 2014:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr og Marin Katrina Frýdal, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til samtyktina í máli nr. 14/02169.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Býráðslimur biður um málið á skrá.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóra og leiðaranum á Byggi- og umhvørvisdeildini.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

**FUNDURIN LOKIN KL. 23:20**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrin Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Sjúrður Olsen |
| | Sigrún Mohr | |